Nr. 10 • Juli 2011

# MIÐ & MAGN



Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið

**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Páll Hansen (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Eyðstein Djurhuus.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda
MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Heygadalsvatn og byrgingin hjá SEV við Vestmanna í baksýni.

**UMSITING**
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900

# Siglir Norrøna undir hentleikaflaggi í 2012 ?



Tey trý manningarfeløgini í Føroyum eru øll limir í altjóða flutningsarbeiðarafelagnum ITF og vilja fylgja teimum reglum, sum felagsskapurin hevur. Vit meta eisini, at tað er umráðandi, at vit fylgja FAS-lóggávuni.

ITF samtykti í 2010 tann sonevnda Meksiko City politikkin. Felagsskapurin hevur eina tilráðing, sum sigur, at fakfeløgini í flaggstatinum hjá skipinum, skulu gera avtalur um tey fremmandu sjófólkini.

Yvirmannafeløgini hava gjørt tríggjar avtalur fyri yvirmenn eftir hesum leisti, hetta fyri at tryggja, at politikkurin hjá ITF verður fylgdur.

Tá Føroya Reiðarafelag gjørdi sáttmála við íslendsk fakfeløg fyri sjófólk, er tað væl skiljandi, at hetta var ørkymlandi fyri Føroya Fiskimannafelag.

Her er talan um, at íslendsk fakfeløg fremja sosiala dumping og vísa vánaligt norðurlendskt samstarv. Hetta er ein álvarsamur trupulleiki.

Tað sær út sum Føroya Reiðarafelag vil vera sera internationalt, men megnar samstundis ikki uppgávuna, sum er at loysa hettar mál i semju við Føroya Fiskimannafelag. Tað eru í dag sterkar kreftir í okkara grannalondum, sum arbeiða fyri at gera tað føroyska flaggið til hentleikaflagg. Avtalan sum Føroya Reiðarafelag hevur gjørt kann bert koyra bensin á bálið.

Norsku og svensku sjóvinnufakfeløguni vilja hava føroyska flaggið skrásett sum hentleikaflagg. Hesi feløg eru sterk í ITF høpi. Norska felagið saman við tí svenska krevja heilt einfalt samráðingarrættin fyri allar útlendingar við skipum undir FAS, sum hava norskan ella svenskan eigara. Tað er teirra meting, at vit fremja sosiala dumping í teirra heimasjógvi.

Eitt stig fyri at forða fyri hesum er, at Føroya Reiðarafelag viðurkennir samráðingarrættin hjá føroyskum feløgum. Men tað er bert eitt stig á leiðini. Tann politiski myndugleikin í Føroyum má gera broytingar í FAS lóggávuni, so lóggávan er í samsvar við ILO konventiónina.

Men tað finnast eisini føroyskir reiðarar, sum halda, at tað er í lagi, at føroyska flaggið verður hentleikaflagg. Manningarfeløgini taka ikki undir við hesum hugburði, tí tá missa vit endamálið við FAS burtur. Vit meta at tað er umráðandi, at føroyingar eru við í eini skráseting á høgum altjóða støðið.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Páll Hansen ábyrgdarblaðstjóri*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705




# Innihaldsyvirlit


Mugu varðveita skjóta vegin upp á brúnna . . . . . . 4
Føroysk hentleikaflagg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
53 prógv handað á Vinnuháskúlanum 17. juni . . . 10
16 skiparaprógv á Klaksvíkar Sjómansskúla . . . . . 14
Heðin Mortensen í brennideplinum. . . . . . . . . . . . 15
Røkt ætlar at fleirfalda vindorkuframleiðsluna. . . 16
Kappingarneytar samráðast um loysn . . . . . . . . . . 22
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum. . . . . . . . . . . 24
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum. . . . . . 26
Makrelsemjan slóðar fyri tilfeingisgjaldinum . . . . 29
Sjóvinnuskeiðini skulu vinna pening . . . . . . . . . . . 33
Framtíð ella blindgøta. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35
Innflyting helst seinkað . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37
Fakfeløgini stuðla útbúgvingarreformi. . . . . . . . . . 39







# Mugu varðveita skjóta vegin upp á brúnna

**Vit føroyingar duga ov illa at síggja okkara styrkir. Ein av hesum styrkjum er navigatørútbúgvingin, sum setir okkum í gott orð á øllum sjey heimshøvum. So latið vera við at leggja fótonglar fyri ta skipan, ið gevur føroyskum yvirmonnum vind í seglini, ljóðar boðskapurin frá Paula Joensen, sum við føroyskum skipsføraraprógvi í hondini fór undir masterútbúgving á universiteti.**

*Eftir Jón Brian Hvidtfeldt*

Vegurin upp á brúnna má ikki gerast óneyðuga kringlutur. Tað er greiða fatanin hjá 30 ára gamla havnamanninum Paula Joensen, sum verjir ta skipan, sum nú er við at mynstra av á Vinnuháskúlanum.

Hóast hansara føroyska skipsføraraprógv varð vigað og funnið ov lætt til beinleiðis atgongd til masterútbúgving á Syddansk Universitet, verjir hann verandi skipan av fullum hjarta.

– Eg varð sendur til eina upptøkuroynd, har eg skuldi lesa 1.500 síður um metodir at analysera og loysa ymiskar cases, og síðani vísa, at eg dugdi at brúka hesi akademisku amboð til at loysa uppgávur. Eg hevði ikki eina góðkenda bachelor, ið prógvaði mínar førleikar á hesum øki, greiðir Pauli Joensen frá.

Eftir lokna upptøkuroynd fór hann undir eina tvey ára masterútbúgving við enska heitinum Transport and Maritime Management. Tað er ein reiðaraútbúgving, sum danska reiðarafelagið og onnur tóku stig til um aldarskiftið, og har dentur verður lagdur á øki sum altjóða búskap og politikk, strategiska leiðslu, entreprenørskap umframt onnur øki við enskum heitum sum International Human Resource Management, Supply Chain Management, Risk Management og so framvegis.

Masterútbúgvingina fór hann undir í 2006, samstundis sum hann var í starvi á manningardeildini hjá reiðarínum Clipper Group. Útbúgvingin kravdi 25 tíma lestnað um vikuna, afturat fullum starvi. Men sjógvurin dróg, og árið eftir fór hann út at sigla við DFDS, har hann áður hevði verið við.

– Tað lat seg gera á tann hátt, at eg kundi lesa umborð. Og hartil hevði eg eina avtalu við DFDS um, at eg kundi vera heima tíðarskeiðini



við møtiskyldu á universitetinum, sigur Pauli Joensen.

## LOPIÐ

Fyri Paula Joensen var skiftið frá Vinnuháskúlanum í Havn til Syddansk Universitet stórt. -Tað var óluksáliga strævið at byrja eina akademiska útbúgving, ásannar hann, og hartil var lestrarumhvørvið heilt hvør sítt.

Ungi havnamaðurin steðgar á eitt stutt sekund, og tankarnir leita aftureftir:

– Eg havi hug at venda tí við. Tú fert á Vinnuháskúlan, tí at tú hevur hug til sjógvin, hug at sigla. Framvegis haldi eg, at mentanin í Føroyum er rættuliga tengd at sjóvinnuni. Tað er ikki óvanligt, at heilt ungir dreingir eiga bát, og heldur ikki óvanligt, at dreingir ikki eru meira enn eini 14 ár, tá teir fyrstu ferð royna sjólívið, antin í praktikk ella í onkrari feriu. Tað er


liv.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Hvør eftirløn hóskar best til tín?
Lív bjóðar sær at laga tína eftirløn til tað lívið, tú vilt liva, og ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Trygg eftirløn
Eftirlønin mennist javnt og støðugt, og tú fært trygd fyri fastari veiting.
Samansett eftirløn
Tað besta úr báðum: tú fært tryggleika, umframt møguleika fyri størri avkasti.
Marknaðareftirløn
Íløgan fylgir marknaðinum, og gevur møguleika fyri ávirkan og størri avkasti.
Innlit í útlit
ekko 239 239

hesin hugur til sjógvin, ið dregur teir at Vinnuháskúlanum, sigur Pauli Joensen.

Argumentatiónin er við at blíva heit, men tó er yvirblikkið til staðar, og skipsførarin rættar inn:

– Skal tú lesa víðari eftir lokna skipsføraraútbúgving, so manglar tær nakrar akademiskar førleikar, viðhvørt eisini leiðsluførleikar. Tað mugu vit bara staðfesta, sigur Pauli Joensen og heldur fram:

– Eg eri als ikki ímóti, at vit hava høgt støði á okkara útbúgvingum, tvørturímóti. Men eftir mínum tykki hava vit eina sera góða skipan í dag. Eina skipan, sum nógv lond øvunda okkum!

## MÁLRÆTTAÐ MASTER

Uppgávurnar á masterútbúgvingini á Syddansk Universitet vóru sum heild vendar móti tí vinnu, ið útbúgvingin varð ætlað. Fyri Paula Joensen merkti tað, at hann eitt nú gjørdi sonevndar „trivnaðar-analysur" av ymsu tjóðskapunum umborð á skipi. Til dømis, hvussu „kulturelle dimensioner," sum tað nevnist, geva seg til kennar millum ymsu tjóðskapirnar.

– Fyri eitt reiðarí hevur tað týdning at vita, hvussu roknast kann við at eittnú russar og filipinar virka saman umborð á skipi. At kenna munin í mentanum og grundleggjandi virðum hjá ymsum tjóðskapum, greiðir Pauli Joensen frá.

Annað dømi um uppgávu var at lýsa vitanar-spjaðingina umborð á eini skipstypu hjá DFDS. Viðkomandi, tí ein feilur umborð á einum skipi kann lættliga vísa seg at vera inngrógvin í mannagongdirnar á øðrum skipum hjá sama reiðaríi.

## UNGA STYRKIN

Tað eru nú trý ár síðani at 30 ára gamli Pauli Joensen varð liðugur við sína masterútbúgving á Syddansk Universitet. Ein útbúgving, ið millum annað førdi hann til eitt starv, har uppgávan var at menna partar av fyritøkuni Nordic Offshore Group, enska starvsheitið var Business Development Manager. Fyrr í ár fluttu hann og familjan aftur til Føroya at búgva, og síðani hevur hann arbeitt við at byggja upp eina fyritøku herheima. Eitt av úrslitunum higartil kom í summar, tá tað eydnaðist Paula Joensen at fáa svensku deildina hjá altjóða Maersk-fyritøkuni Svitzer at flagga øll síni skip inn í Føroysku Altjóða Skipaskránna, FAS.

Hansara greiða fatan er, at fyri føroyingar er avgerandi at varðveita ta styrki, ið gjøgnum mong ár hevur givið føroyskum yvirmonnum so gott orð á sær.

– Føroyska skipanin leggur upp til, at ungir dreingir við alski til sjógvin hava skjóta atgongd til Vinnuháskúlan. Tí er ikki óvanligt at síggja føroyskar skipsførarar í fyrru helvt av tjúgunum. Hetta eru viðurskifti, ið fleiri lond øvunda okkum, metir Pauli Joensen og vísir á, at í okkara grannalondum eru skipsførarar ofta væl eldri enn teir føroysku, tá teir fáa prógvið í hondina.

Hann vísir á, at sambært hagtølunum sigla yvirmenn í meðal ikki meira enn eini sjey til tíggju ár, áðrenn teir leita sær aðrar vegir. Eftir hansara fatan hava nógvir skipsførarar, møguliga eftir nøkur ár á sjónum, hug at fara undir víðari, hægri lestur. Og her kundi Vinnuháskúlin hjálpt teimum á leið, til dømis við at bjóða eina styttri, fyrireikandi útbúgving, ið gjørdi teir til reiðar til hægra lesturin.

– Føroyingar eru kendir fyri at eiga gott sjófólk, og partur av frágreiðingini er eftir mínum tykki skjóti vegurin upp á brúnna. Tann skjótleikin fer úr skipanini, um fleiri upptøkukrøv verða sett teimum, ið ætla sær á Vinnuháskúlan, sigur Pauli Joensen.

Pauli Joensen saknar og eftirlýsir grundgevingar fyri, hví verandi maritimar útbúgvingar skulu broytast til bachelor-útbúgvingar.

– Vit áttu at byrja við at analysera fyrimunirnar og vansarnar við teimum maritimu útbúgvingum, sum vit hava í Føroyum, sigur hann.

Hansara greiða tilmæli er at varðveita verandi skipan, og so heldur bjóða útbúnum skipsførarum møguleikan fyri at taka eitt styttri, fyrireikandi skeið ella útbúgving omaná, og á hendan hátt bøta um møguleikarnar fyri hægri lestri innan maritima økið.

## SVENSKI ÁHUGIN

Í sínum starvi innan shipping hevur Pauli Joensen samband við nógv fólk frá vinnuni. Ein teirra er formaðurin í svenska reiðarafelagnum, Lars Höglund, ið eisini er stjóri í Nolsö Shipping. Höglund hevur fleiri ferðir víst stóran áhuga fyri verandi, føroysku skipsføraraútbúgving. So mikið stóran, at hann sigur seg vera til reiðar at fáa sviar hendavegin at nema sær føroysku útbúgvingina.

– Hví ikki gera nakað munagott fyri at fáa útlendingar hendavegin at taka útbúgvingar á Vinnuháskúlanum. Eg veit at fleiri lond øvunda okkara skipan, so hví ikki geva teimum møguleikan at royna hana? Og fyri Vinnuháskúlan hevði tað verið ein spennandi avbjóðing at flutt seg til ein altjóða skúla við lesandi úr øðrum londum afturat føroyingunum, sigur Pauli Joensen.

# Skeiðskema 2011



| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | aug. | sept. | okt. | nov. | des. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA AUTOMATIC RADAR PLOTTING AIDS | 4 | 8.900 | | | 3 | 21 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC GENERAL OPERATOR CERTIFICATE (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC GENERAL OPERATØR CERTIFICATE, RENEWAL OF COURSE | 7 | 7.000 | | | | 28 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE | 7 | 8.900 | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC LONG RANGE CERTIFICATE, WITH INMARSAT | 8 | 9.950 | | | | 28 | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>TANKERS SAFETY, SPECIAL COURSE FOR OIL-, GAS- AND CHEMICAL TANKERS | 5 | 6.800 | | 26 | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>TRANSPORT OF DANGEROUS GOODS IN DRY CARGO SHIPS | 3 | 5.400 | | 5 | | 14 | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY | 4 | 7.500 | | | 03<br>24 | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra). um prógvið er eldri enn 10 ár<br>SUPPLEMENTARY TRAINING IN MEDICAL PROFICIENCY<br>WHEN CERTIFICATE IS OLDER THAN 10 YEARS | 10 | 12.000 | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>COURSE IN ELEKTRONIC CART DISPLAY INDICATION SYSTEM | 4 | 8.900 | | 12 | 31 | | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>RENEWAL OF MARITIME TRAINING CERTIFICATE | pr. dag | 1.500 | | | | 7 | |
| 12 | SSO-skeið<br>COURSE FOR SHIP SECURITY OFFICERS | 3 | 5.400 | | 19 | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>WORKING ENVIRONMENT §16-COURSE | 4 | 5.800 | | | 17 | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið. Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>COURSE AS BOLIER TENDER | 5 | 7.500 | | | | 4 | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>FIRE FIGHTING ON BOARD SHIPS | 3 | 5.650 | 29 | 19 | 03<br>31 | 21 | 12 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi. STCW A-VI/1-2<br>REFRESHER COURSE IN FIRE FIGHTING | 1 | 2.900 | 11 | 01<br>29 | 31 | 03<br>24 | 15 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi. STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING | 2 | 4.100 | | | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 9.750 | 01<br>08<br>15<br>22 | | | | 05 |
| 19 | Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil. STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>ADVANCED FIRE FIGHTING FOR SHIPS OFFICERS | 5 | 8.650 | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | 17 | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking. (Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | |
| 25 | Grundleggjandi trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 3 | 4.550 | | | | | |
| 26 | Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3, A-VI/1-4<br>BASIC SAFETY TRAINING | 6 | 10.260 | | | | | |
| 27 | Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1<br>PROFICIENSY IN SERVIVAL CRAFT AND RESCUE BOATS | 4 | 4.700 | | 22 | | | |
| 28 | Medisinsk fyrstahjálp. STCW A-VI/4-1<br>MEDICAL FIRST AID | 4 | 6.000 | | | | | |
| 29 | Maritime Legislation. e-learning (Sign up on www.vh.fo)<br>FØROYSK SJÓVINNULÓG. E-LEARNING | | 5.000 | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA - TEL 60 80 80

# Føroyskt hentleikaflagg

**Føroysku manningarfeløgini vóru 3. juni 2011 kallaði á fund hjá ITF í London í sambandi við eina áheitan frá Norsk Sjømansunion og svenska SECO um sat eta FAS (føroyska skipaskrásetingin) á listan yvir hentleikafløgg. Niðurstøðan á fundinum var, at málið verður viðgjørt í november. Til ta tíð hava allir partar bundið seg til at royna at finna loysnir, so allir sjómenn við FAS skipum fáa eina hóskandi setanaravtalu.**

Lat okkum her eisini nevna, at International Transport Federation, stytt ITF, er ein felagsskapur av fakfeløgum, sum arbeiða innanfyri tað, sum vit kunnu kalla flutningsøkið. Talan er um tey, sum fáast við flogferðslu, lastbilaflutning og skipaferðslu. Harumframt er ein fiskimannadeild og ein havnaarbeiðaradeild. Høvuðsarbeiðið hjá ITF er at tryggja, at øll, sum arbeiða í hesum vinnum hava eitt minstamark, sum skal lúkast; tað vil siga, at talan er um minimumssáttmálar.

Tey trý manningarfeløgini í Føroyum hava verið limir í ITF í nógv ár. Her kunnu vit nevna, at Óli Jacobsen, fyrrverandi formaður í Fiskimannafelagnum, var formaður fyri fiskimannadeildina hjá ITF í rættiliga rúma tíð.

## FOC – HENTLEIKAFLAGG

FOC stendur fyri „flag of convenience", sum „listi við hentleikafløggum".

Tað er soleiðis, at ITF hevur í mong ár roynt at forða fyri, at reiðarí uttan víðari skifta flagg á skipunum. Tað vil siga flyta skipini til eitt annað „registar" fyri at sleppa undan at gjalda fólkinum eina nøktandi løn, ella at sleppa undir lond har trygdarkrøvini eru linari. Tað er soleiðis, at ITF hevur ført eina sokallaða FOC „kampanju" í rættiliga nógv ár, og í tí sambandinum hava teir gjørt ein lista yvir tey fløgg, sum ITF metur vera hentleikafløgg. Tá er talan um lond, sum ikki hava skipaðan arbeiðsmarknað; tey hava hvørki fakfeløg ella arbeiðsgevarafeløg. Tað vil siga, at tey loyva at arbeiðsgevarar løna fólki langt undir tað, sum verður roknað sum minstamark. Hesi lond hava tað, sum nevnt verður "sosial dumping". Hesin listin er avmarkaður til viðurskiftini hjá manningini, og hevur onki við teknisku støðuna hjá skipinumat gera; tá snýr tað seg um ein annan lista.

## SAMRÁÐINGARRÆTTURIN Í FØROYUM

Tað er soleiðis, at tað koma alsamt fleiri og fleiri skip inn í FAS skipanina, og hetta gevur føroysku manningarfeløgunum eina eyka uppgávu, tí „officielt" er tað soleiðis í ITF-samanhangi, at samráðingarrætturin fyri sjómenninar liggur altíð í heimlandinum hjá skipinum. Tað vil siga, at fyri FAS skip liggur samráðingarrætturin í Føroyum.

Men har hava vit ein trupulleika í føroysku FAS-lóggávuni, sum ikki av sær sjálvum gevur føroysku manningarfeløgunum rættin at samráðast fyri útlendskar sjómenn. Nøkur av reiðaríunum, sum eru komin undir føroyskt flagg hava latið samráðingarrættin til føroysku manningarfeløgini.

## EIN TRUPULLEIKI

Men her hava vit fingið trupulleikar av einari ávísari grein í FAS lógini. Talan er um grein 12, sum sigur, at føroysk manningarfeløg kunnu bara gera sáttmála fyri limir, sum eru búsitandi í Føroyum, meðan útlendsk manningarfeløg kunnu gera sáttmála fyri persónar, sum eru búsettir í heimlandinum hjá manningarfelagnum sjálvum.

Hetta er greitt brot á ILO konventiónina á hesum øki, og tí hava vit heitt á Vinnumálaráðið um at fáa hesi tingini broytt soleiðis, at føroyska FAS lógin er í tráð við altjóða ásetingar soleiðis, at samráðingarrætturin fyri sjómenninar kemur at liggja í Føroyum.





*Myndir frá samráðingarfundi á skrivstovuni hjá ITF í London. Umboð fyri Føroyar: Jan Højgaard, Eyðstein Djurhuus, Páll Hansen og Sjúrður Heinesen.*

## FAROESE MARITIME UNIONS, STYTT FMU

Lat okkum nevna, at føroysku manningarfeløgini hava tikið stig til ein felagsskap nevndur FMU, sum stendur fyri Faroese Maritime Unions. Tað eru føroysku manningarfeløgini, sum eru í hesum felagsskapi.

Faroese Maritime Unions hevur bert eina uppgávu; tað er at tryggja, at teir sjómenn, sum sigla undir føroyskum flaggi hava kollektivan sáttmála á einum rímiligum støði. Vit hava gjørt nógvar sáttmálar á hesum økinum. Serliga fyri tey svensku skipini, sum eru komin í FAS-skipanina.

Og teir sáttmálarnir eru gjørdir saman við svenskum fakfeløgum fyri at tryggja, at ongin verður verri fyri, tá skip koma undir føroyskt flagg.

Lat okkum skoyta uppí, at vit eisini eru farnir undir at gera sáttmála saman við reiðarafelagnum fyri filipinskar sjómenn. Ein onnur uppgáva hjá FMU er at tryggja, at føroyska flaggið líkur øll trygdar- og umhvørviskrøv, soleiðis at eingin í altjóða shipping umhvørvinum kann seta fingurin á nakað undir tí føroyska flagginum.



# 53 prógv handað á Vinnuháskúlanum 17. juni

Skúlahøllin í Vinnuháskúlanum var fullsett fríggjadagin 17. juni 2011, tá skúlin skipaði fyri hátíðarhaldi í sambandi við, at prógv vóru handað nýklaktum skiparum, maskinmeistarum og skipsførarum.

Tommy Petersen var innboðin gestarøðari. Harumframt vóru fleiri, sum ynsktu næmingunum tillukku við próvnum; teirra millum Petur Hans Dahl, Eyðstein Djurhuus og Páll Hansen.



*Tommy Petersen, gestarøðari.*

## PETUR HANS DAHL: 27 SKIPSFØRARAR ER MET Á VINNUHÁSKÚLANUM

Brot úr røðuni hjá Petur Hans Dahl, tá prógvini vóru handað : „Á hesum góða summardegi 4 dagar frammanundan ársins longsta degi, kunnu okur saman gleðast um, at okur hava fingið 7 nýggjar skiparar, 27 skipsførarar og 19 maskinmeistarar. At 27 skipsførarar blivu lidnir, er met fyri skúlan.

## STØRSTU TØL HIGARTIL VÓRU 26 SKIPSFØRARAR Á SUMRI 1997 OG 25 HÁLVT ÁR FRAMMANUNDAN.

Je plagdi at kalla ungdómin, sum veksur upp í dag, fyri teldugeneratiónina. Tað er bæði gott og ringt. Mangir av tykum ungu monnum hava sum yngri sitið og spælt telduspøl og harvið gloymt allan veruleikan rundan um tykkum.

Ansi eftir, at tykur ikki taka henda hugburð við umborð, tí so kann tað gangast sum hjá stýrimanninum á polska farmaskipinum, sum í góðum sýni sigldi á eitt kinesiskt tangaskip norðan fyri Bornholm fyri nøkrum árum síðan, meðan hann stóð eftir høvdinum niðri í radaranum og plottaði.

Kineska tangaskipið sakk, men øll manningin bjargaðist tíbetur. Minnist tí til tað mest grundleggjandi



*Petur Hans Dahl*



á eini brúgv: Hyggi út. Í maskinrúminum er eisini ein rúgva teldustýrt, men maskinan er heldur ikki nakað telduspæl, men veruligir ventilar, stemplir, krumtappar og annað, sum krevur eina køna hond. Tað er verri enn so alt, sum kann stýrast við teldu.

## VINNUHÁSKÚLIN UNDIR FRÓÐSKAPARSETRI

Ein av ætlanunum hjá Mentamálaráðnum er at seta í gongd bachelorútbúgving og leggja skúlan undir Fróðskaparsetri.

Okur lótu eitt álit um hetta til Mentamálaráðið í 2006, og ætlanin er at koma í gongd við hesi nýggju útbúgving í 2012.

Í somu ætlan liggur, at skipara- og maskinistútbúgvingin bert verður í Klaksvík.

## MIÐNÁMSÚTBÚGVING VERÐUR KRAV

Kravið at sleppa inn á skúlan til skipsførara og maskinmeistara verður tá miðnámsútbúgving. Hjá teimum, sum ikki hava tað, verður møguleiki at koma á ein forskúla í eitt ár. Henda nýggja útbúgving fær viðmæli frá útbúgvingarráðnum, har bæði vinna og reiðarar eru umboðaðir. Hjá miðnámsnæmingum er hetta eisini ein eyka møguleiki at vera verandi í Føroyum og fáa eina bachelorútbúgving. Tað kundi hugsast, at okur fingu fleiri lesandi júst frá miðnámsskúlunum.

## TILGONGDIN ER STÓR

Sum tykur kanska hava sæð í fjølmiðlunum, so er tilgongdin til skúlan rættiliga stór í løtuni. Vit taka yvir 100 nýggjar inn 1. august, og tað eru skiparar, skipsførarar, maskinmeistarar og maskinistar, og tá standa rættiliga nógvir eftir á bíðilista. Talið av lesandi á skúlanum verður tá yvir 300.

## SKÚLIN HEVUR EINA VIRKNA SKEIÐDEILD

At enda, nú próvtøkan er av, vil je takka próvdómarum fyri rættvísa døming og lærarunum fyri gott arbeiði, sum okur síggja úrslitið av í dag.

Hjartaliga tillukku til allar próvtakararnar, og til maskinmeistararnar og skipsførararnar, sum nú fara frá okkum, vil je siga, at skúlin hevur eina virkna skeiðdeild, so at okur rokna við at síggja tykum aftur á ymiskum skeiðum av og á.



*Páll Hansen*



*Eyðstein Djurhuus*

# 53 PRÓGV HANDAÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM



***Maskinmeistarar:*** *Heri Vestergaard, Fróði F. Nielsen, Høgni á Borg Gaard, Marner Ø. Bech, Dánial Petur Abrahamsen, Bárður Zachariasen, Andrias D. B. Joensen, Ingolf S. Berg, Jákup Súni Andreasen, Áki Petersen, Jens Tórður M. Kruse, Kristmund Nielsen, Eivind H. Gudmundsen, Rasmus Eysturoy, Olgar Jan S. Lervig, Eilif Jacobsen, Johan S. Poulsen, Tom T. Hansen, Jóan Petur Brandal.* ***Virðislønir vóru lætnar:*** *1. Andrias D. B. Joensen, fototól frá BANKNORDIK, 2. Rasmus Eysturoy, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum, Ídnisvirðisløn:, Rasmus Eysturoy, gullur frá A. P. Møller*



*Nýggj nautisk útgerð á Vinnuháskúlanum*



**Skipsførarar:** *Rúni Niclassen, Torkil Jógvansson Dalsgaard, Sólbjørn Haldursson, Svein Eliasen, Trygvi Thomsen, Jákup Elias Sjatlá, Bárður Sørensen, Gunnar Árnason Højgaard, Hallur Kjærbæk, Torkil Joensen, Óli Hammer, Jan Erik T. Pedersen, Jack Joen-Jacobsen, Bogi Ziska, Ássvein Mikkelsen, Jóan Jákup Torbjarnarson, Sofus Olivar Poulsen, Ernst Súni Ennigarð, Eyðun Madsen, Joen Petur Joensen, Levi Joensen, Poul Arni Jacobsen, Bergur Gudmundsen, Andreas D. P. Thomsen, Pauli Hammer, Karstin N. Jespersen.* **Virðislønir vóru lætnar:** *1. Jan Erik T. Pedersen, gull ur frá A. P. Møller, 2. Bogi Ziska, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar.* **Primus motor:**, *1. Trygvi Thomsen, ur, knív og pennasett frá Søfartens Ledere*



**Skiparar:** *Trygvi Breyt Hermansen, Jóhan Jacob Olsen, Páll Atli Magnussarson Jacobsen, Jacob Stakksund, Jóannes Niclas Didriksen, Aksel Eliasen, Anton Søderstrøm Nielsen.* **Virðislønir vóru lætnar:** *1. Jóannes N. Didriksen, kikara frá P/F Thor, 2. Anton S. Nielsen, barometur og klokkusett frá Faroe Agency, 3. Trygvi B. Hermansen, barometur og klokka frá Faroe Ship*

# 16 skiparaprógv á Klaksvíkar Sjómansskúla

Klaksvíkar Sjómansskúli skipaði fyri hátíðarhaldi 20. juni 2011, tá 16 mans fingu handað skiparaprógv.

Rólvur í Norðnastovu og Berint Kalsø fingu virðisløn frá Tryggingarfelagnum og Norðoya Sparikassa fyri gott avrik á Klaksvíkar Sjómansskúla.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag letur í sambandi við próvtøkuhandan virðisløn til besta avrikið millum næmingarnar á Vinnuháskúlanum og Klaksvíkar Sjómansskúla. Eyðstein Djurhuus handaði Rólvi í Norðnastovu úr Mikladali hesa virðisløn undir hátíðarhaldinum í Klaksvík 20. juni.



***Skiparar frá vinstru:*** *Hanus Kjølbro, leiðari á Klaksvíkar Sjómansskúla, Árni Stenberg, Sumba, Dan Knudsen, Glyvrar, Líggjas Joensen, Nes, Berint Kalsø, Klaksvík, Dan Thomsen, Klaksvík, Fróði Thomsen, Sumba, Rúni Hansen, Søldarfjørður, Jann í Giljum, Klaksvík, Signar Jacobsen, Klaksvík, Hans Asbjørn Eysturdal, Innan Glyvur, Eliesar Jakobsen, Skopun, Ingvald Justesen, Klaksvík, Bernhard Gudmundsson, Klaksvík, Christian Olsen, Klaksvík, Eyðun Højbro, Klaksvík, Rólvur í Norðnastovu, Mikladalur, Á myndini mangla: Jógvan Petersen, Viðareiði. Jógvan Tróndheim, Klaksvík og Regin Mørkøre, Hósvík.*



***Frá vinstru:*** *6 næmingar á Klaksvíkar Sjómansskúla, sum hava gingið í sjóvinnuflokki, fingu eisini handað prógv 20. juni 2011.*



***Frá vinstru:*** *Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Berint Kalsø og Rólvur í Norðnastovu, sum fekk virðisløn fyri besta avrikið millum næmingarnar á Vinnuháskúlanum og Klaksvíkar Sjómansskúla.*




# HEÐIN MORTENSEN

**Útbúgving:**
- Realprógv, Vágs skúli 1979
- Maskinsmiður, hjá Bent Mortensen Vágur 1983
- Maskinmeistari, Føroya Maskinmeistara Skúli 1986
- Víðkað Maskinmeistara prógv við Maskinmeistara skúlan í Keypmannahavn 1988

**Verandi starv:**
Maskinstjóri á Norrønu

**Hjúnafelagi:**
Jana norðan úr Klaksvík.

**Børn:**

Katla 21, Brandar 15, Roðar 11

**Besta bók:**
Lesi bert góðar bøkur, hvør er tann besta er ringt at siga

**Fyrstu ferð til skips:** 1983

**Longsti túrur til skips:**
6 mánaðir við gomlu Norrønu 1986

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:**
- Smyril Line: Gomlu Norrønu.
- CJ Shipping: Weser
- Scand Lines: Tvíkiljur millum Keypmannahavn / Nyhavnina og Malmø, og Flogvøllin í Kastrup og Malmø. Hesar tvíkiljur itu Løberen, Sælen, Ørnen, Saga Viking og Sifka Viking.
- Fregatt ferjan „Berlin Express“ millum Gedser og Rostock.

**Størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag:**
At verða dagførdur, og annars at virka professionelt hóast trongar karmar so uppgávan verður loyst nøktandi í mun til høgu krøvini.

**Frítíðarítriv:** Kamping, fiska, túrar við familjuni og fríðka um húsini viðm.

**Bilur:**
Toyota Verso (2010)

**Telda:**
Fujitsu Lifebook

**Besti sangur:**
Tá so nógvir góðir eru, kann eg ikki bara peika ein út til at verða tann besta, men tað er heilt víst onkur føroyskur….

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Jalig og arbeiðssom menniskjur, og sjálvandi at síggja míni børn glað og eydnurík.

**Hvat kann øsa teg.**
Neilig grenjut menniskjur

# Røkt ætlar at fleirfalda vindorkuframleiðsluna

**Við at pumpa vatn niðan í byrgingina á Mýrum, kann Røkt í Vestmanna goyma vindorkuna, tá brúk ikki er fyri henni á el-netinum. Framleiðslan hjá Røkt av reinari vindorku og vatnstabiliseraðari vindorku verður tá slakar 40 milliónir kWh um árið. Framleiðslan hjá felagnum í dag er 6-7 milliónir kWh.**



*Jóhan í Niðristovu, stjóri í Røkt, væntar sær nógv av nýggju verkætlanini við vatnstabiliseraðari vindorku. Hann fýlist tó á SEV, sum hann heldur arbeiða alt ov lítið miðvíst við málinum. – Vit steðga tó ikki, um SEV sigur nei. Tað er ikki SEV, men Jarðfeingi og Vinnumálaráðið, ið eiga endaligu avgerðina, sigur hann.*

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Tað var eftir tógvið stríð við myndugleikarnar og serliga SEV, at Røkt í Vestmanna í 2003 loksins slapp í gongd við sína vindmylluverkætlan á Mýrum omanfyri Vestmanna. Tríggjar vindmyllur vórðu settar upp tá, hvør á 660 kW (kilowatt).

Og síðani tá hevur verið arbeitt av dýrastu makt fyri at sleppa at seta fleiri vindmyllur upp og økja framleiðsluna.

Í 2004 søkti Røkt um loyvi at vaksa um sjálva vindorkuframleiðsluna, men hetta varð noktað. Fyri einum góðum ári síðani fekk felagið tó eitt fyribils loyvi frá Elveitingareftirlitinum at fara undir eina kombineraða vind- og vatnorkuverkætlan, har vindmylluorka verður nýtt til at pumpa vatn úr Heygadalsvatni og niðan í Mýravatnið.

Tá verkætlanin er framd, verður vindorkukapasiteturin á Mýrum/Junkarahaganum seksfaldaður. Verandi myllur eru á til samans 2 MW (megawatt), og í nýggju verkætlanini skulu myllur á til samans 10 MW setast upp afturat, so samlaði mátturin verður 12 MW. Av tí at nakað av orkuspilli kann væntast, økist nettoframleiðslan út á netið lutfalsliga nakað minni – hon fer úr smáum 7 milliónum kWh (kilowatttímum) um árið í dag í slakar 40 milliónir kWh um árið.

Tað sermerkta við nýggju verkætlanini er, at við henni ber til at goyma orkuna.

## VINDUR VEKSLAÐUR TIL VATN

Ein trupulleiki við vindmyllum og vindorku er annars ein óstøðug framleiðsla, alt eftir sum veðrið er, og vantandi møguleikar at goyma



*Verkætlanarøkið hjá Røkt. Niðast er Heygadalsvatn, haðani vatnið skal pumpast niðan í tað ovara vatnið, Mýravatnið. Tær nýggju myllurnar á til samans 10 MW skulu standa við Mýravatn, har hinar myllurnar hjá Røkt eisini standa. Nýggja verkið við turbinu og pumpu skal gerast inni í fjallinum millum vøtnini.*

orkuna, tá hon ikki kann nýtast beinanvegin á netinum.

Í nýggju verkætlanini hjá Røkt verður talan um sonevnda vatnstabiliseraða vindorku.

Í stuttum kann sigast, at óstøðuga vindorkan verður vekslað til støðuga vatnorku, tá hon ikki skal brúkast beinanvegin.

Orkan frá nýggju myllunum, sum skulu setast upp, skal nevniliga nýtast at pumpa vatn úr niðaru byrgingini – Heygadalsvatni – upp í ovaru byrgingina – Mýravatnið omanfyri Vestmanna, tá tørvur ikki er á at framleiða beinleiðis út á netið, serliga um náttina.

Í tí gongdini verður vindorkan sostatt goymd sum vatnorka.

Tá hon so skal brúkast, verður orkan tikin oman aftur sum vatnorka, framleidd í einum nýggum 10 MW vatnorkuverki, sum skal byggjast við Heygadalsvatn – leyst av verandi Mýraverkinum.

## SNILD TØKNI

Vatnturbinan og pumpan eru í somu mekanisku skipan, og til tað krevst snild tøkni. Millum annað er tað ein avbjóðing at fáa pumpuna at koyra støðugt, tá vindurin er óstøðugur.

Tá pumpan arbeiðir, má snúningstalið á henni haldast støðugt, eisini tá vindurin fellur av, og ongin orka tískil kemur til pumpuna frá myllunum.

Men av tí, at vatnturbinan situr á sama aksli, ber tá til at lata hana taka um endan og hjálpa til at dríva pumpuna, so hon varðveitir snúningstalið.

Á enskum nevnist henda tøknin hydraulic shortcircuit.

Tøknin ger, at tað yvirhøvur ber til at hava bæði vatnturbinu og pumpuskipan í einum og sama verki.

Ein onnur stór avbjóðing er sjálv stabiliseringin. Tað at javna toppar og dalar í stóru framleiðslusveiggjunum, ið eyðkenna vindorku við skiftandi vindi. Bruttoframleiðslan av vindorku er nevniliga eins skiftandi og vindmegin, men trupulleikin við sveiggjunum verður bastur við tí, ið tey í Røkt kalla frekvensvasking. Tað vil siga, at vatnturbinan hjálpir til at halda setta framleiðslumálið.




*Myllurnar, sum Røkt setti upp í 2003, eru 660 kW hvør – til samans sløk 2 MW. Tær skulu halda fram við at framleiða streym beinleiðis út á el-netið og verða tískil ikki knýttar í pumpuskipanina í nýggju verkætlanini.*

## „FREKVENSVASKARÍ"

Nýggju myllurnar skulu sjálvsagt í fyrsta lagi gjøgnum skipanina framleiða orku beinleiðis út á netið, eins og tær tríggjar myllurnar, sum Røkt frammanundan hevur uppi á Mýrum við Vestmanna, og tær hjá SEV í Neshaga í Eysturoynni.

Men í nýggju verkætlanini verður óstøðuga vindorkan gjørd støðug við vatnorkuni. Vatnorkan skal við øðrum orðum setast í staðin fyri tann mest óstøðuga partin av vindorkuni.

Um til dømis ætlanin er, at alt verkið eitt tíðarskeið skal framleiða 7 MW út á netið, so verður syrgt fyri at halda vindorkupartin eitt sindur niðanfyri tað og í staðin lata ein part koma frá vatnturbinuni.

Til ber at økja vatnorkupartin alt eftir, hvussu óstøðugur vindurin er. Henda útjavningarskipanin verður av Røkt kallað eitt frekvensvaskarí.

Ein vatnstabiliserað vindorkuframleiðsla á Mýrum við Vestmanna fær eisini jaligt árin á verandi vatnorkuframleiðsluna í Vestmanna.

## MEIRI ORKA Í HEYGADALI

Fyri at leggja upp fyri ógvusligum avfalli og minka um vandan fyri yvirfloti verður í dag alla tíðina syrgt fyri at halda vatnstøðuni í Heygadalsvatni nakrar metrar niðan fyri hámarkið.

Hetta verður ikki neyðugt, tá vatn verður pumpað niðan í Mýravatn. Úrslitið er, at vatnstøðan og harvið trýsthæddin kann verða hægri í Heygadalsvatni. Hetta merkir, at el-framleiðslan á Heygaverkinum hjá SEV, sum tekur vatn úr Heygadalsvatni, kann økjast 2-3 prosent.

Sambært tølunum hjá Røkt – ið felagið sjálvt sigur vera lágt sett – fer felagið at kunna framleiða slakar 40 milliónir kWh (kilowatt-tímar) av reinari orku um árið, tá verkætlanin er liðugt framd.



*Røkt er eitt felag, ið roynir at reka bóndavirksemi øðrvísi. Felagið er knýtt at Niðristovu-festinum í Vestmanna. Vindorka er bara eitt av frábrigdunum frá vanligum bóndavirksemi. Smoltframleiðsla er eitt annað. Smoltstøðin hjá Røkt er á Heygadalsvatni, ið letur vatnið til Heygaverkið á Válinum. Fremst í myndini sæst Mýraverkið hjá SEV, ið fær vatn frá Mýra-byrgingini longur uppi. Mýraverkið við Heygadalsvatn er 50 ára gamalt og skal ikki vera partur av nýggju verkætlanini. Í staðin ætlar Røkt at byggja eitt heilt nýtt kombinerað pumpu/turbinu-verk inni í fjallinum millum Heygadalsvatn og Mýravatn.*

33 milliónir kWh fara at stava frá nýggju verkætlanini.

Nýggju vindmyllurnar fara at kunna framleiða 35 milliónir kWh um árið, men 2.2 milliónir kWh verða mistir í gongdini at pumpa vatn niðan og taka tað omanaftur.

Væntandi verður pumpað átta tímar um dagin í meðal, og restina av tíðini verður framleitt beinleiðis út á netið.

Tað merkir, at 11 milliónir kWh um árið skulu brúkast at pumpa við, meðan 24 milliónir kWh fara beinleiðis út á netið.

Í arbeiðsgongdini at pumpa vatn niðan og taka tað oman aftur í turbinuna verða 20 prosent av orkuni mist, so 8.8 milliónir av teimum 11 milliónum kWh enda við at verða gagnnýttir sum vatnorka.




*Turbina og pumpa koyra á sama aksli. Tá vindurin er óstøðugur, fær pumpan ov lítið av megi frá vindmyllunum til at halda neyðuga snúningstalið. Hendir tað, letur turbinan upp, so meira orka fæst til pumpuna haðani. Skipanin, sum nevnist hydraulic short-sircuit, ger, at tað ber til at hava pumpu og turbinu í somu orkuringrás.*



*Mýravatn avmyndað frá vindmyllunum. Í nýggju verkætlanini skulu fleiri myllur setast upp her at framleiða til netið og at pumpa vatn frá Heygadalsvatni og niðan í Mýravatn.*

Nettoframleiðslan í nýggju verkætlanini hjá Røkt verður sostatt 32.8 milliónir kWh um árið.

## STÓR ÍLØGA

Men fær Røkt loyvi til verkætlanina, skulu stórar íløgur gerast í myllur, pumpu/turbinu-verk og vatntunnil.

Frammanundan hevur SEV eitt vatnturbinuverk í Heygadali, sum tekur vatn úr Mýravatninum. Hetta verkið, Mýraverkið, er 50 ár og hevur eina 2,4 MW turbinu, sum framleiðir umleið 12 milliónir kWh um árið.

Men sambært Jóhan í Niðristovu, stjóra hjá Røkt, er teirra ætlan at byggja eitt nýtt verk inni í fjallinum óbundið av verandi Mýraverkinum.

– Turbinan hjá teimum er 50 ára gomul og nærkast pensjónsaldrinum. Tá vit koma inn og kunnu framleiða 32.800 kWh um árið afturat verðandi framleiðslu, verður ríkiligt rúm fyri, at SEV kann senda sítt Mýraverk á pensjón. Men tað er sjálvsagt teirra avgerð, sigur hann.

Røkt roknar við eini íløgu á til samans 255 milliónir krónur. Vindmyllurnar væntast at kosta til samans 100 milliónir krónur við eini niðurgjaldingartíð á 15 ár. Pumpa/turbina og tunnil væntast at kosta 130 milliónir krónur, sum skulu vera goldnar eftir 30 árum, eins og tær seinastu 25 milliónir krónurnar, ið væntast at koma afturat í ymiskum útreiðslum.

## FAKTA

### SOLEIÐIS SÁ FØROYSKA EL-FRAMLEIÐSLAN ÚT Í FJØR SAMBÆRT HAGTØLUNUM HJÁ SEV:

| | |
|---|---|
| Termisk orkuverk*: | 199.344 milliónir kWh |
| *(*kynd við tungolju ella diesel)* | |
| Vatnorkuverk: | 67.395 milliónir kWh |
| Vindmyllur*: | 13.584 milliónir kWh |
| *(*SEV og Røkt til samans)* | |
| Til samans: | 280.323 milliónir kWh |

Vindorkuparturin, 13.584 milliónir kWh, er 5 prosent av samlaðu nýtsluni.

Vindorka og vatnstabiliserað vindorka verður sambært útrokningum hjá Røkt umleið 16 prosent av samlaðu nýtsluni, um nýggja verkætlanin hjá Røkt verður gjøgnumførd.

## LØNANDI VERKÆTLAN

Røkt hevur roknað upp á tølini og heldur seg hava eina góða vøru at bjóða, sum eisini verður lønandi fyri felagið.

Felagið tekur støði í verandi elprísi hjá SEV, sum í meðal er 1,19 kr fyri kilowatt-tíman, tá avgjøld ikki eru íroknað. Útreiðslurnar til netið eru settar til 0,33 kr/kWh. Munurin er 0,86 kr/kWh, sum er prísurin, ið SEV sambært kostnaðarætlanini hjá Røkt skal keypa streymin fyri.

Við væntaðu árligu nettoframleiðsluni á 32.800 kWh verður inntøkan frá nýggju verkætlanini 28,2 milliónir um árið við tí prísinum.

– Vit skulu brúka umleið 13 milliónir krónur um árið til avdráttir tey fyrstu 15 árini, til myllurnar eru niðurgoldnar. Síðani fer tað talið niður á umleið seks milliónir krónur um árið. So tað hongur saman fíggjarliga, har ein hóskandi partur av inntøkunum verður eftir til raksturin, sigur Jóhan í Niðristovu.

Hann vísir á, at møguligar inntøkur frá tiltøku-orku (stand-by-orku) ikki eru við í inntøkumetingini. Vatnturbinan kann annars altíð framleiða til netið, bara vatn er í Mýravatninum, og tískil vera til at taka í staðin fyri tungolju- ella dieselmotorarnar, sum SEV í dag nýtir til tað endamálið.

Enn liggur ikki fast, hvussu nógvar myllur skulu setast upp, tí talan helst verður um eina kombinasjón av 0,9 og 2,3 MW myllum – til samans skulu tær hava ein framleiðslumátt á 10 MW.

Tíðarætlanin fyri uppsetan av myllunum er trý summør, og hini arbeiðini fara væntandi at taka hálvt annað til tvey ár at gera.



*Myllurnar, sum Røkt longu hevur uppi á Mýrum, framleiða umleið 7 milliónir kWh um árið. Við nýggju verkætlanini økist orkuframleiðslan her á staðnum upp í slakar 40 milliónir kWh um árið. Tað svarar til góð 16 prosent av allari el-orkunýtsluni í Føroyum í fjør. Í dag eru bert 5 prosent av el-orkuni vindorka.*



*Byrgingin í Heygadalsvatni. Tá vatn verður pumpað niðan í Mýravatn, ber til at hava hægri vatnstøðu her. Tað merkir hægri trýsthædd og harvið økt orkuframleiðsla úr Heygadalsvatni eisini.*

# Kappingarneytar samráðast um loysn

**Endamálið er at finna bestu loysninar upp á, hvussu vit vinna á trupulleikunum við at skula nøkta ein vaksandi orkutørv og samstundis verja umhvørvið og minka um oljunýtsluna. Tað heldur Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður í SEV, sum heldur vil samráðast við Røkt enn berjast við felagið. Tað heldur Jóhan í Niðristovu, stjóri í Røkt, eisini, men hann fýlist á seinførið hjá SEV.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Tað var eftir drúgva togtogan við loyvismyndugleikarnar og serliga net-eigaran SEV, at privata felagið Røkt í Vestmanna í 2003 loksins slapp at seta sínar tríggjar vindmyllur upp á Mýrum í Vestmana.

Men togtoganin steðgaði ikki tá, tí Røkt hevur alla tíðina havt ætlanir um at menna og útbyggja sína orkuframleiðslu.

Og tá Elveitingareftirlitið fyri einum góðum ári síðani gav Røkt loyvi at fara undir verkætlanina at goyma vindorku við at pumpa vatn úr byrgingini í Heygadali niðan í byrgingina á Mýrum í Vestmanna, kærdi SEV í stundini ta avgerðina. Økið er nevniliga markað sum vatnorkuøki, og SEV hevur einarætt upp á vatnorkuframleiðslu í Føroyum.

## TOSA HELDUR ENN TOGTOGAST

Men í vár varð kæran fyribils sett til viks, tí tað eydnaðist pørtunum at sessast við samráðingarborðið í einum samráðingarbólki í staðin. Í bólkinum sita Páll á Reynatúgvu, formaður í SEV-nevndini, Jákup Suni Lauritsen, næstformaður, Finn Jakobsen, tekniskur stjóri í SEV, Jógvan Ellefsen, sakførari hjá SEV, Jóhan í Niðristovu, stjóri í Røkt, og Hans Trúgvi Teirin, sakførari hjá Røkt.

– Vit vilja heldur royna samstarvs- og samráðingarvegin, og í fyrstu atløgu snýr tað seg um at vit og Røkt skulu royna at fáa eina felags fatan av orkustøðuni. Síðani skulu vit royna at fáa felags stev. Røkt er eitt privat felag, og vit eru eitt felagskommunalt, alment felag. Tí eru atlitini sjálvandi ymisk, men kortini haldi eg ikki, at tey eiga at verða ein forðing fyri góðum samstarvi. Bara tað, at tað hevur eydnast tveimum gomlum kappingarneytum at seta seg niður og saman royna at finna eina loysn, boðar frá góðum, sigur Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður í SEV.


*Páll á Reynatúgvu*

Jóhan í Niðristovu, stjóri í Røkt, vónar eisini at fáa eina samráðingarloysn, men heldur SEV bera alt ov seint at.

– Um SEV ynskir at vera við í nýggju verkætlanini hjá Røkt, eiga teir at arbeiða nógv meira miðvíst við málinum. Annars hevur mynduleikin á økinum, Jarðfeingi og Vinnumálaráðið, lógarheimild at geva Røkt teir neyðugu karmarnar, so at verkætlanin kann fara í gongd, sigur hann.

Fyribils eru samráðingarnar við Røkt endaðar við einum uppskoti til eitt sonevnt „letter of intent“ – ætlanarlýsing, sum skal vera støði undir meira ítøkiligum samráðingum.

## HYGGJA FRAMEFTIR

Hóast hann er hin einasti, ið úttalar seg um málið vegna SEV, so ber Páll á Reynatúgvu seg undan at gera viðmerkingar til stríðið um vindorkuteknikk – um hvat ber til, og hvat ikki ber til – sum verið hevur millum SEV og Røkt gjøgnum árini.

– Eg og Jákup Suni Lauritsen, næstformaður í SEV, umboða eigararnar í samráðingarbólkinum, og vit vilja heldur hyggja frameftir. Vit eru í tí støðu, at orkutørvurin alsamt økist. Samstundis hava vit bundið okkum til at minka um útlátið av koltvísúrevni, og eigarar og nevnd hjá SEV hava eisini ta støðu, at vit nú eiga at kanna allar orkuframleiðsluhættir, sum sleppa okkum undan at taka fleiri áir og vøtn til elframleiðslu. Við tí fyri eyga er tað eyðsæð, at verkætlanin hjá Røkt passar væl inn í myndina, tí hon snýr seg um endurnýtslu av vatnorkuni í einum øki, sum frammanundan er ein miðdepil í elframleðsluni við øllum tí undirstøðukervinum, ið hoyrir henni til, staðfestir Páll á Reynatúgvu.

## VESTMANNA AFTURLØNAST

Hann vísir eisini á, at Vestmanna, síðani elektrisitetið kom til Føroya, hevur latið nógv til landið.

– Fyri at allir føroyingar kunnu hava streym, hava vestmenningar latið stór øki av náttúru til endamálið. Tí eiga vit eisini at hugsa um, hvussu vit kunnu løna økinum tað aftur, sigur nevndarformaðurin í SEV.

Hann leggur tó dent á, at SEV vil hava fult álit á, at verkætlanin hjá Røkt hongur væl saman tøkniliga og fíggjarliga, áðrenn almenna orkufelagið sigur endaligt ja til eitt samstarv.

Páll á Reynatúgvu væntar, at tað í mesta lagi ganga tvey ár og í minsta lagi eitt ár, áðrenn SEV kann taka endaliga støðu til verkætlanina hjá Røkt.

– Bara tað at fáa lýst málið og eftirkannað alt tað tøkniliga og tølini tekur í minsta lagi eitt hálvt ár. SEV er ein stórur felagsskapur við nógvum eigarum, so at taka avgerð í slíkum stórum málum, sum eru bæði tøkniliga og fíggjarliga viðbrekin, tekur sína tíð, sigur hann.

SEV ætlaði at hava kunnandi fund um málið fyri øllum kommununum – tær eiga í felag SEV – í juni, men tann fundurin mátti útsetast til í august.



*Orkukeldurnar í Vestmanna. Navnið Heygadalur og Heygadalsvatn vanta á kortinum – tað er áin, ið eitur Heljareyga.*

## RØKT STEÐGAR IKKI

Jóhan í Niðristovu, stjóri í Røkt, hevur enn vónir um, at samráðingarnar við SEV fara at enda við eini samstarvsavtalu.

– Vit tosa saman í einum jaligum anda, og hóast tað ikki er nóg mikið bara at tosa, so síggi eg bjart upp á framtíðina. Vit mugu tó sjálvsagt vera fyrireikað upp á, at SEV endar við at siga nei. Vit steðga tó ikki av tí orsøk. SEV er ein avgerandi leikari á føroyska orkumarknaðinum og eigur netið. Men sum áður nevnt, so eru tað aðrir myndugleikar, ið hava heimild at taka endaligu avgerðina, um roynt verður at forða góðum orkuverkætlanum, staðfestir Jóhan í Niðristovu.

Tað er Elveitingareftirlitið undir Jarðfeingi, ið endaliga skal gera av, um Røkt fær loyvi til sína verkætlan. Loyvið, sum longu er latið, men sum SEV kærdi, snýr seg tó bert um eina afturlætna skipan, har øll orkan frá myllunum verður nýtt til at pumpa vatn frá Heygadalsvatni niðan í Mýravatn. Tað merkir, at loyvið ikki fevnir um rættin at framleiða inn á netið hjá SEV.

Í verkætlanini og kostnaðarætlanini hjá Røkt verður hinvegin roknað við egnari elframleiðslu bæði við vatnturbinu og beinleiðis frá myllunum út á netið.

Í fyrstu atløgu er tað SEV og í evsta føri aftur Elveitingareftirlitið, sum skal geva loyvi at framleiða streym til el-netið.

## BROT ÚR DAGBÓKINI

**25. mars: Portugalið**
Fundur sambært reglugerðini fyri samstarvsráðnum

**25. mars: MF**
Nevndarfundur, sjey mál á skránni m.a. eftirmeting av aðalfundi, endurskoðan av heimasíðuni og sáttmálakrøv til RFF.

**28. mars: Advokatvirkið**
Fundur um Faroe Fish 2.

**30. mars: Fiskimálaráðið**
Uppskot um avtalu millum grunnin og ALS.

**30. mars: Føroya Reiðarafelag**
Fundur um samanskriving av sáttmálanum so, at allar semjurnar koma inn í sáttmálan.

**31. mars: Lív**
Fundur millum MF, FSN og Lív um samlagstryggingina.

**06. mars: Portugálið**
Fundur í Sjóvinnuráðnum, um undanásetningi til tangabátin Norden.

**07. apríl: FSN**
Fyrireikandi fundur millum semingsmenninar FSN og MF

**08. apríl: FSN.**
Blaðfundur Mið og Magn, Eftirmeting av síðsta blaðið.

**10. apríl: NMF**
Dagurin gekk allur til ferðing. frá Føroyum til Álands.

**11. apríl: Mariehamn**
Vanligur NMF fundur har 13 mál vóru á skránni millum annað landaraportir.

**12. apríl: Mariehamn**
Vitjan á Åland Maritima Safety center og maskinmeistaraskúlanum.

**13. apríl: NMF**
Heimferð hjá øllum luttakararnirum á møtinum.

**14. apríl: Sjóð og vektarbúðin**
Fundur um manningarskjal til tangabátin Norden.

**14. apríl: Føroya Reiðarafelag**
Fundur millum reiðarafelagið og manningarfeløgini um at skriva eitt tíðindaskriv um til fangisgjald.

**19. apríl: Sjóvinnustýrið**
Tosa bleiv um ákæruna frá norska sjómannafelagnum

**19. apríl: MF**
Nevndarfundur 9 mál á skránni

**28. apríl: MF**
Sáttmálasamráðingar millum Reiðarafelagið fyri Farmaskip og manningarfeløgini, framløga av sáttmálakrøvum.

**02. mai: Hotel Føroyar**
Fundur saman við semingsmanninum og Strandfaraskipum landsins.

Semingsmenninir góðu boð um at vit skuldi fara undir veruliga seming tann 13 í hesum.

**03. mai: Portugalið**
Fundur um manningar sjal til tangabátin Norden.

**05. mai: Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar millum Reiðarafelagið fyri Farmaskip og manningarfeløgini,

**05. mai: FSN**
Blaðfundur Mið og Magn.
Greinar til komandi blað.

**10. mai: Faroe Pelagic**
Fundur á skrivstovuni hjá Óla Jákup advokati.

**13. mai: FSN**
Blaðfundur Mið og Magn.
Greinar til komandi blað.

**14. mai: Hotel Føroyar**
Seming byrjaði kl 14.00 millum SSL, MF og FSN

**!5-05-2011. Hotel Føroyar**
Semingsfundurin helt fram alt døgnið.

**16. mai: Hotel Føroyar**
Semingin helt fram til umleið kl. 07.00 um morgunin, tá semingsmenninir boðaðu frá at tað skuldi takast eitt teimout.

**16. mai: Norrøna**
Í døgunum 16 mai til 19 mai luttók nevndin saman við starvsfólkið, í áhugaverdum skeiði umborð á Norrønu. Endamálið við skeiðinum var at geva skeiðluttakarunum innlit í løgfrøðiligt grundarlagið hjá einum fakfelag, serliga við atliti til uppgávur og ábyrgd hjá nevndarlimum umframt dagliga virksemi í fakfelagnum.

**23. mai: Hotel Føroyar**
Semingi um skipini hjá SSL uppaftur tikin.

Komu til semju umleið midnáttartíð.

**25. mai: MF**
Fundur um váli viðvíkjandi Norrønu, og um fund við ITF.

**25. mai: ALS-Húsið**
Fundur í nevndini hjá inntøkutrygd.

**26. mai: Vinnunevndin**
Fundur við vinnunevndina um makrelmálið.

**26. mai: LÍV**
Fundur við Lív,um avtaluna um samlagstrygging

**27. mai: MF**
Nevndarfundur 7 mál á skrá, millum annað Faroe Pelagic, RFF og FAG samráðingar.

**30. mai: FSN**
Blaðfundur Mið og Magn.
Greinar til komandi blað.

**01. juni: Mentamálaráðið**

**02. juni: London**
Ferðingardagur til London á fund hjá ITF um kæru.
Við á fundinum umboð fyri MF, FSN og FF.

**03. juni: London**
Fundur á høvuðsskrivstovuni hjá ITF.

**04. juni: London**
Heimferð umvegis Keypmannahavn.

**08. juni: Vinnuhúsið**
Fundur millum manningarfeløgini og reiðara felagið farmaskip.

**09. juni: Vinnuhúsið**
Fundur millum manningarfeløgini og felagið nótaskip.

**10. juni: Vinnuhúasið**
Undirskriva sáttmála við Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nýggi sáttmálin hevur umframt smávegis broytingar í sáttmálatekstinum eisini eina hækking, sum svarar til tær hækkingar, sum í hesi samráðingarrunduni hava verið á privata arbeiðsmarknaðinum annars, tað vil siga 3,62 % í sáttmálatíðarskeiðnum.

**14. juni: Kaffihúsið í Vágsbotni**
Kunning frá nýggju eigaranum av LÌV, nú Bank Nordik hevur keypt 50% av ognarfelaginu LÌV.

**15 juni: FF**
Framhald av sáttmálasamráðingum millum manningarfeløgini og Reiðarafelagið fyri farmaskip.

# FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Hans Ingvard Hansen | 7. oktober 1941 | 70 ár |
| Bjarki Johansen | 3. september 1951 | 60 ár |
| Rasmus Heinesen | 27. september 1951 | 60 ár |
| Viggo Christiansen | 29. september 1951 | 60 ár |
| Oddmar Petur Petersen | 23. oktober 1951 | 60 ár |
| Terji Holm | 11. oktober 1961 | 50 ár |
| Fríðolvur Lervig | 21. oktober 1961 | 50 ár |
| Jákup Dam | 10. august 1971 | 40 ár |
| Solberg Jacobsen | 17. august 1971 | 40 ár |
| Hallur Petersen | 23. august 1971 | 40 ár |
| Bennie Højgaard | 13. september 1971 | 40 ár |

# BROT ÚR DAGBÓKINI

**28. mars: Faroe Law**
Fundur um endaliga uppgerð av hýrukrøvum móti Faroe Seafood.

**30. mars: Fiskimálaráðið**
Fundur í stýrinum fyri Trygdargrunnin, semja var um at broyta minstulønina og treytirnar fyri minstaforvinningi. Hetta varð gjørt fyri at tryggja at grunnurin ikki tømist áðrenn hann veruliga er komin at virka.

**30. mars: Gongin**
Reiðarafelagið og Manningarfeløgini hittast til at innskriva allar sáttmálabroytingar í eitt felags skjal.

**31. mars: Lívstrygging**
Fundur um gongdina í Samlagstrygginini. Tíverri mugu vit staðfesta at verandi inngjøld eru ov lítil og mugu hækka í nærmastu framtíð.

**1. apríl: MF**
Nevndarfundur í FMU.

**6. apríl: Portugálið**
Sjóvinnuráðið viðger kæru um manningarásetan.

**7. apríl: FSN**
Fundur við semingsmenninar í ósemju fyri SSL

**8. apríl: FSN**
Blaðnevndarfundur

**11. apríl: Fiskimálaráðið**
Teir, sum hava ment Sporføriskipanina kunna Trygdargrunnin um hesa skipan.

**14. apríl: Vinnuhúsið**
Sáttmálakrøv verða løgd fram mótvegis Reiðarafelagnum Fyri Farmaskip.

**28. apríl: MF**
Samráðingar fyri farmaskipini.

**29. apríl: Norðurlandahúsið**
Nótaskip skipar fyri ráðstevnum um umsiting av fiskirættindum.

**02. mai: Hotel Føroyar**
Seming um SSL.

**03. mai: Portugalið**
Sjóvinnuráðið gevur ikki Maskinmeistarafelagnum viðhald í kæru um manningarásetan á bunkerskipininum Norden.

**04. mai: Rættarnevndin**
FSN er biðið um at siga sína hugsan um herdar revsingar fyri dálking frá skipum. FSN ávaraði ímóti, at herða revsingarnar órímiliga nógv.

**05. mai: FSN**
Blaðnevndarfundur.

**06. mai: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð lógarbroyting um treytirnar fyri at vera í Bólki 5A.

**09 til 11. mai: Stavanger**
Norðurlendska Navigatørkongressin viðger felagsmál. Vitja varð hjá Oljudirektoratinum og Petroleumtilsýninum.

**13. til 16. mai: Hotel Føroyar**
Seming um SSL.

**16. mai: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðger lógaruppskot um makrelfiskiskapin í 2011

**16. til 19. mai: Norrøna**
Fakfelagscruise fyri nevndarlimir og starvsfólk hjá fakfeløgum. Tíverri avlýstu fleiri feløg túrin vegna ósemju millum FF og Smyril-Line.

**23. og 24. mai: Hotel Føroyar**
Seming um SSL, partarnir góðtóku semingsuppskot.

**24. mai: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð kunngerð um troling innanfyri 12 fjórðingar og kunngerð um treytir fyri makrelfiskiskapi.

**26. mai: Vinnunevndin**
FSN er boðið at siga sína áskoðan um lógaruppskot um makrelfiskiskap í 2011

**26. mai: LÌV**
Fundur um hvussu vit skipa samlagstryggingina í framtíðini.

**27. mai: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um at friða fyri allari vinnuligari veiðu innanfyri 3 fjórðingar. Ráðið var ikki samt um hetta uppskot.

**30. mai: Nor-Lines**
Fundur við reiðarí um setanarviðurskifti hjá útlendskum, sjómonnum sum teir hava í starvi. Reiðarin upplýsti at uml 70 føroyingar eru hjá reiðarínum.

**31. mai: MF**
FMU hevur fund við FAS og umboð fyri Nolsø Shipping.

**01. juni: Hafnia**
Realurin hevur aðalfund. Eginognin er nærum 1 milliard, stovnurin er sostatt væl fyri at fíggja skip.

**08. juni: Vinnuhúsið**
Samráðingar fyri farmaskip

**09. juni: FF**
P/F Framherji vil tosa við manningarfeløgini um sáttmála fyri Høgaberg.

**14. juni: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um, at loyva avmarkaða snellufiskiskap á Føroya Banka.

**14. juni: Kaffihúsið**
Bank Nordik og Lív kunna fakfeløg um søluna av LÍV.

**15. juni: FF**
Manningarfeløgini gera sáttmála fyri Høgaberg.

**16. juni: FSN**
Søfartens Ledere hevur limafund hjá FSN. Sáttmálin við donsku reiðarafeløgini gekk út 1, apríl í 2010, og er framvegis ikki komin uppá pláss. Ósemja er um hvussu teir fáa endurgoldið skattalættan, sum øll onnur á danska arbeiðsmarknaðinum hava fingið.

**17. juni: Vinnuhúsið**
Samráðingar fyri farmaskip.

**21. – 22. og 23. juni: Vinnuhúsið**
Sáttmálasamráðingar fyri farmaskipini.

**23. juni: Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot til kunngerð um sølu av makrelkvotu.

**24. juni: FSN**
Blaðnevndarfundur

**27. juni: MF**
Fundur í FMU

**28. juni: Vinnuhúsið**
Samráðingar fyri farmaskip

**28. juni: ALS**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum

**28. juni: FAS**
Fundur við reiðaríi Switzer sum flagga 9 skip undir FAS. Sáttmáli er gjørdur fyri yvirmenninar.

# FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUM OKKARA

| | | |
|---|---|---|
| Páll Horn | 23. september1931 | 80 ár |
| Sigmund Poulsen | 27. september 1931 | 80 ár |
| Dánjal Húsgarð | 30. august 1941 | 70 ár |
| Esmundur L. Sørensen | 18 september 1941 | 70 ár |
| Jákup Martin Müller | 29. september 1941 | 70 ár |
| Andrias Dam | 8. oktober 1941 | 70 ár |
| Heini Vesturdal | 18. oktober 1941 | 70 ár |
| Kári Forná | 9. august1951 | 60 ár |
| Eisenberg Hansen | 16. august 1951 | 60 ár |
| Sámal Erik Djurhuus | 26. august 1951 | 60 ár |
| Kriss Poulsen | 3. september 1951 | 60 ár |
| Dávur Joensen | 4. september 1951 | 60 ár |
| Finnbogi Hansen | 7. september 1951 | 60 ár |
| Hendrik Hansen | 7. september 1951 | 60 ár |
| Kristin Vilhelmsen | 13.september1951 | 60 ár |
| André Johannesen | 15.oktober 1951 | 60 ár |
| Pauli í Jansagerði | 19. oktober 1951 | 60 ár |
| Hanus Durhuus | 14. juli 1961 | 50 ár |
| Suni Poulsen | 14. juli 1961 | 50 ár |
| Bjarni Kass | 3. august 1961 | 50 ár |
| Zacharias (y) Bech | 11. august 1961 | 50 ár |
| Wenzel Højgaard | 15. august 1961 | 50 ár |
| Dánial Jóhan Fredal Johansen | 1. september1961 | 50 ár |
| Hákun S. Egilsnes | 8. oktober 1961 | 50 ár |
| Eyðstein Ólason | 21. oktober 1961 | 50 ár |
| Jógvan Tróndarsson | 21. oktober 1961 | 50 ár |
| Jógvan Gulaksen | 15. juli 1971 | 40 ár |
| Hjalti Eliasen | 28. juli 1971 | 40 ár |
| Poul Skaalum | 8. august 1971 | 40 ár |
| Kári Strøm Justinussen | 7. september 1971 | 40 ár |
| Jónfríður Poulsen | 10. september 1971 | 40 ár |
| Remi Nicolajsen | 24. september 1971 | 40 ár |

# TRYGGINGARGJALDIÐ HÆKKAR

Gongdin í Samlagstryggingini hevur verið somikið vánalig, at neyðugt er við eini hækking av inngjaldinum.

Tað eru fleiri orsakir til íkomnu støðuna, skaðagongdin hevur verið verri enn metingarnar søgdu.

Trupulleikar hava eisini verið við innkrevjing av gjøldunum, tí er nú avgjørt, at feløgini sjálv skulu innkrevja peningin frá reiðarínum.

Hetta gevur ikki so nógv eyka arbeiði hjá feløgunum, tí vit longu nú eftirkanna, at limagjøld og eftirlønargjøld verða goldin. Longu nú innkrevja vit hetta gjald frá reiðaríum, sum eru í eftirstøðu ella eru farin á húsagang.
Tað eru tveir mátar at gjalda inn uppá; mánaðarløntir gjalda fast gjald hvønn mánað og teir, sum eru við fiskiskipi hava goldið eitt gjald fyri hvønn mynstraðan dag. Daggjaldið hevur verið ásett soleiðis, at ein sum hevur verið 180 dagar umborð hevur goldið líka nógv sum ein mánaðarløntur.

Gongdin í fiskiflotanum seinastu árini hevur verið, at nærum øll skip hava dupulta manning. Hetta førir við sær, at hvør maður er færri dagar umborð, men hevur framvegis fullan tryggingardekning.

Nú verður daggjaldið ásett útfrá 160 døgum umborð. Frá 1. september 2011 verða gjøldini hesi: Fyri mánaðarløntar 350,- kr. pr. mánað, og fyri fiskiskip 27,- kr. fyri hvønn mynstraðan dag.

Semja er gjørd við Lívstryggingina (LÍV), at teir bera tað hall, sum hevur verið í skipanin ímóti, at feløgini í framtíðini sjálv umsita inngjøldini, og nevnda hækking verður gjøgnumførd nú.

Um skipanin gevur avlop næstu fimm árini skulu LÍV og feløgini deila avlopið.


Slipway

- Our team of skilled and experienced fitters ensure quick service 24/7
- Slipway up to 800 tonnes and 65 mtr LOA
- Extensive workshops adjacent to quay
- Hydraulic and deck machine repairs
- Engine servicing and overhauls
- Highly qualified in stainless steel and normal and certified procedures
- PON SLD
- CAD drawings

KENIT

KSS

24/7 Tel.: +298 232030 • Main Office Tel.: +298 472030
info@kss.fo • www.kss.fo

# Makrelsemjan slóðar fyri tilfeingisgjaldinum

*Eftir Jón Brian Hvidtfeldt*

Meginreglan um tilfeingisgjald verður staðfest. Setningurin er tikin úr sonevndu makrelsemjuni, ið Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Tjóðveldi og Framsókn undirskrivaðu mikukvøldið 20. apríl. Flokkarnir valdu at brúka serligu støðuna, har úrslitaleysar strandalandasamráðingar høvdu fingið Føroyar at áseta sær eginkvotu á 150.000 tons av makreli, umframt serstøðuna á heimliga, politiska pallinum, har ABC-samgongan var tødnað niður í eina minnilutasamgongu. Serstøðan bleiv brúkt til at fáa hugtakið tilfeingisgjald inn í føroyskan fiskivinnupolitikk.

Tilfeingisgjald, 25 oyru fyri hvørt kilo, er lagt á tilsamans 66.450 tons av makreli í føroyskum sjógvi í ár. Tað gevur tilsamans góðar 16 milliónir krónur í tilfeingisgjaldi, ið sambært løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya, samtykt 30. mai, skulu inn í Búskapargrunnin. Nótaskipini skulu gjalda tilfeingisgjald av 25.000 tonsum av makrelkvotuni, meðan hesin skipabólkur fær 35.000 tons uttan tilfeingisgjald. Allir aðrir skipabólkar, sum fáa burtur av felagskvotuni á 41.450 tons (upprunaliga 38.000 tons), skulu gjalda tilfeingisgjald.

Afturat tilfeingisgjaldinum á nevndu 66.450 tons av makreli, inniber makrelsemjan, at 20.000 tons av makreli skulu bjóðast út og seljast á uppboði í summar. Fíggjarmálaráðið hevur mett, at uppboði fer at kasta 10 milliónir krónur av sær.

Sambært semjuni millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn er tilfeingisgjaldið komið fyri at vera. Um framtíðar fiskivinnupolitikkin skriva flokkarnir soleiðis: „Uppskot um varandi tilfeingisskatt / uppboðssølu á marknaði og um landingartreytir verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi 1. oktober 2011. Flokkarnir eru samdir um… at orða eitt uppskot hesum viðvíkjandi við serfrøðiligari hjálp frá Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Landsbankanum, vinnuni og Havstovuni."

Longu í ár er eitt annað slag av tilfeingisskatti lagt á fiski- og alivinnuna. Talan er um ein øktan partafelagsskatt á 2,5 prosent av yvirskoti omanfyri eina millión krónur. Og verður hugt í játtanarkarmarnar fyri 2012, ið løgtingið samtykti 30. mai, verður roknað við 40 milliónum krónum í tilfeingisskatti næsta ár.

### FAKTA

Í grein-2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap stendur soleiðis um tilfeingið í havinum:

Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks. Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

LES SJÓNARMIÐ FYRI OG ÍMÓTI TILFEINGISGJALDI Á FYLGJANDI SÍÐUM



*Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður:*

# Fyrsta royndin móti semju um tilfeingisgjald fyri alla fiskivinnuna

Eingin ivi er um, at vit fáa eina ella aðra skipan við tilfeingisgjaldi fyri alla fiskivinnuna, og í somáta er serstøðan við makrelinum í ár brúkt sum ein roynd. Tað sigur Kaj Leo Holm Johannesen við Mið & Magn, sum tó ikki vil læsa seg fastan í, um leisturin í ár nú eisini verður tann endaliga loysnin. Tíðarskeiðið fram til 1. oktober skal brúkast til at finna ein leist við tilfeingisgjaldi, ið breiðast møgulig semja fæst um.

Kaj Leo Holm Johannesen er av tí fatan, at tilfeingisgjald í veruleikanum kom inn við lógini um vinnuligan fiskiskap.

– Stálið er einki vert, tí virðini liggja í loyvunum at fiska. Higartil hevur tilfeingisgjaldið tí ligið úti í vinnuni, millum reiðaríini. Tað er tann veruleika, ið vit vilja broyta, soleiðis at ognarrætturin er staðfestur hjá landinum og brúksrætturin hjá einstøku skipunum, sigur Kaj Leo Holm Johannesen, og peikar fram móti 2018, tá verandi fiskiloyvi fara úr gildi.

– Langtíðarmálið er at finna eina haldbara og burðardygga skipan í góðari tíð áðrenn 2018. Stutttíðarmálið er at finna politiskt konsensus um eitt tilfeingisgjald fyri alla fiskivinnuna, sigur Kaj Leo Holm Johannesen.

Løgmaður ásannar, at broyttar fortreytir kunnu hava við sær, at onkur liggur eftirá.

– Men sum politikarar mugu vit skapa karmar fyri alt samfelagið, og konkurslógin má vera galdandi og virka, bæði á landi og sjógvi, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann leggur tó dent á, at samstundis sum ein skipan við tilfeingisgjaldi verður løgd á alla fiskivinnuna, er neyðugt at loysa upp fyri verandi bindingum. Avmarkingarnar í vinnuni skulu í størst møguligan mun burtur, sigur løgmaður, og dregur ein parallel til alivinnuna, ið seinnu árini hevur fingið størri rásarúm at gera tillagingar.



*Johannus Martin Olsen, formaður í Felagnum Línuskip:*

# Tilfeingisgjald verður steinur oman á byrðu hjá línuflotanum

Línuflotin er longu nú niðurbundin av avmarkingum og forðingum, og skipini liggja fíggjarliga tungt í sjónum. So fyri okkum er tað meiningsleyst at tosa um tilfeingisgjald, ið er beinleiðis niðurbrótandi fyri okkara part av flotanum, sigur Johannus Martin Olsen, sum samstundis eftirlýsir betri karmar fyri vinnuna.

Formaðurin í Felagnum Línuskip vísir millum annað á avmarkingarnar í møguleikunum frítt at endurnýggja línuskipini við størri og meira modernað skip, ið eitt nú kunnu skera fiskin til flak og frysta umborð. Og hann eftirlýsir fleiri og betri veiðimøguleikar fyri henda part av flotanum.

Johannus Martin Olsen tekur tí sjálvandi væl ímóti tankanum hjá løgmanni um at loysa upp fyri verandi bindingum í fiskivinnuni.

– Men fyrst mugu leinkjurnar takast av, so okkara hendur kunnu arbeiða frítt og skapa yvirskot, áðrenn politikararnir koma við nýggjum eykaskattum á línuflotan, ið tyngja raksturin, sigur Johannus Martin Olsen og heldur fram:

– Vit hava í dag ikki neyðugu karmarnar og fortreytirnar fyri at fáa yvirskot í flotan, og stríðast tí við yvirhøvur at fáa endarnar at røkka saman fíggjarliga. Og tí kunnu vit ikki vera við í diskusjónini um ein eykaskatt, ið verður steinur oman á byrðu fyri okkum.

Hann leggur afturat, at sjálvandi er Felagið Línuskip altíð til reiðar at tosa um loysnir. Men higartil tykist leisturin við tilfeingisgjaldinum at vera ein politisk semja burturav, ið als ikki er rótfest í vinnuni.

– Er hetta veruliga tað mest slóðbrótandi, ið man kann finna uppá fyri at bøta um karmarnar hjá vinnuni, spyr Johannes Martin Olsen retoriskt.

Hann minnir á, at tað ikki er so langt síðani at fiskivinnan varð noydd at lofta skipanini við minstuløn, og fíggjar nú sjálv Trygdargrunnin, ið varð settur á stovn við einum alt ov lítlum grundfæi.



*Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnu- og fiskivinnumálum:*

# Tilfeingisgjald ella – skattur er veruleiki

Tilfeingisgjald ella -skattur á alla tilfeingisvinnuna verður veruleiki. Tað er Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnu- og fiskivinnumálum sannførdur um. Hann vísir á longu galdandi serlóg fyri 2011, sum leggur eykaskatt á yvirskot omanfyri eina millión krónur í fiski- og alivinnuni.

– Tað er lítil ivi um, at eisini í komandi tíðum verður tilfeingisgjald ella –skattur veruleiki, sigur landsstýrismaðurin, og vísir á, at í løtuni verður arbeitt við einum uppleggi til nýggja skipan fyri fiskivinnuna.

– Endamálið er at leggja vinnuna í tryggar karmar frameftir, eisini eftir 2018. Hetta fyri at vinnan veit, hvat hon hevur at fyrihalda seg til, tey nógvu komandi árini, sigur hann.

Sambært landsstýrismanninum er tilfeingisgjaldið ein staðfesting av, at tilfeingið í havinum er „ogn føroya fólks,“ samsvarandi lógini um vinnuligan fiskiskap.

– Brúksrættin fáa tey einstøku skipini, ið hava loyvini at veiða og gagnnýta hetta tilfeingið. Og fyri brúksrættin verður kravdur ein árligur skattur ella gjald fyri, sigur Johan Dahl.

Hann vísir samstundis á, at verandi bindingar á vinnuna mugu verða bloyttar upp, so vinnan kann laga seg til tær til eina og hvørja tíð broyttu umstøðurnar og fáa sum mest burtur úr tilfeinginum.

Johan Dahl leggur dent á, at politiski myndugleikin má alla tíðina hava í huga at skapa góðar karmar og fortreytir fyri vinnuna, bæði innanlands og úti í heimi, so vinnan kann fáa sum mest burturúr samfelagnum og vinnuni – til gagns og menning.

– Eg meti ikki, at hesi tilfeingisgjøld eiga at síggjast sum ein forðing ella fótongul fyri vinnuna, sigur Johan Dahl, og heldur fram:

– Eftir mínum tykki eigur tilfeingisgjaldið at koma vinnuni og samfelagnum sum heild til gangs. Ítøkiliga at brúka pengarnar til uppraðfesting av SAR-tænastuni (Search and Rescue), Fiskiveiðieftirlitinum, til fiskirannsóknir, marknaðarføring, menning av matvøruframleiðslu, og annars gransking og menning innan vinnuna.



*Sigurd Poulsen, stjóri í Landsbankanum:*

# Tilfeingisgjaldið loftar sveiggjunum

Størsti fyrimunurin við einum tilfeingisgjaldi er, at gjaldið vil gera inntøkurnar frá fiskivinnuni til samfelagið størri og javnari. Ein fortreyt fyri hesum er at tilfeingisgjaldið verður savnað í ein búskapargrunn, ið sleppur at vaksa seg stóran. Ein sterkur búskapargrunnur vil nevniliga vera førur fyri at geva landskassanum rímuliga javnar, árligar inntøkur, ið kunnu taka broddin av stóru sveiggjunum, ið vit síggja í fiskivinnuni í dag.

Tilfeingisgjaldið vil sum fráliður tillaga yvirkapacitetin í fiskiflotanum, soleiðis at lønsemið hjá tí einstaka skipinum verður størri. Hetta vil sjálvandi kosta hjá onkrum, men yvirskipað vil hetta vera gagnligt fyri vinnuna og samfelagið sum heild.

Ein vansi við tilfeingisgjaldinum á fiskivinnuna er, at gjaldið kann vera ringt at svølgja hjá vinnuni. Tað kostar her og nú, og verður av mongum sæð sum eitt eyka gjald.

– Hinvegin hevur vinnan upplivað, at oljan bleiv nógv dýrari, og skip høvdu trupult við at loysa. Men vinnan hevur roynt at tillaga seg. So onkursvegna kann man kanska siga, at tað tykist vera lættari at góðtaka fortreytir, ið koma uttanifrá, heldur enn um onkur tekur stig til at broyta fortreytirnar, sigur Sigurd Poulsen.

– Fara vit eitt stig víðari og selja fiskidagar, so vil prísurin sjálvandi verða stýrdur av, hvussu fiskastovnarnir eru fyri. Er nógv til av fiski, vilja skip vera til reiðar at gjalda nógv fyri dagarnar, og øvugt, tá lítið er at fáa. Harvið kann man siga, at tað almenna tekur á seg ein vága, sum vinnan í dag ber einsamøll, og eisini hetta vil javna sveiggini í fiskivinnuni, sigur Sigurd Poulsen.

Samanumtikið sær stjórin í Landsbankanum stórt sæð bara fyrimunir við einum tilfeingisgjaldi.

– Vælferðin, ið vit kenna hana í dag, krevur ein støðugan búskaparvøkstur. Og tilfeingisgjaldið er avgjørt eitt átak, ið stuðlar undir at skapa búskaparvøksturin, sigur Sigurd Poulsen.



*Torbjørn Jacobsen, framsøgumaður í fiskivinnumálum fyri Tjóðveldi:*

# Máttu slúka tilfeingisgjald afturfyri tilfeingisrentu

Verandi leistur við tilfeingisgjaldi á makrelin er eitt politiskt kompromis, ásannar Torbjørn Jacobsen, tá hann skal samanbera leistin við fiskivinnupolitikkin hjá Tjóðveldi.

– Tjóðveldi arbeiðir fram ímóti eini liberalisering og demokratisering av sjálvum rættinum, atgongdini, til at veiða. Tað er uppskotið um Tilfeingisbúðina, sum eitt samt floksting tók undir við í Vestmanna á vári 2010, sigur fiskivinnupolitiski framsøgumaðurin.

Torbjørn Jacobsen ger greitt, at Tjóðveldi er ímóti tilfeingisgjaldi.

– Vit eru ímóti, at politiska skipanin einvíst kann áseta eitt gjald á tilfeingi pr kilo uttan at hetta á nakran hátt stendur í mun til marknaðarkreftirnar, sum annars eru galdandi í vinnuni. Hetta kann hava við sær, at embætisverk og ein politiskur meiriluti til eina og hvørja tíð kunnu skrúva uppá sjuntin heilt tilvildarliga og eftir tørvinum á peningi í landshúsarhaldinum. Hetta kann vinnan als ikki liva við, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann ásannar tó, at verandi leistur við tilfeingisgjaldi kann tulkast júst á tann hátt, ið Tjóðveldi sigur seg vera ímóti:

– Ja, tað er rætt. Men okkara upprunastøða var at bjóða alla ásettu kvotuna út á uppboði. Vit gjørdu tó eina semju, har bæði modellini eru inni. Tað er so luturin hjá einum minniluta, at hann ikki fær øll síni sjónarmið ígjøgnum, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hjartamálið hjá Tjóðveldi er harafturímóti tilfeingisrentan.

– Tilfeingisbúðin snýr seg í stuttum um, at tey gomlu fiskiloyvini, sum vit kenna, ikki eru til, og at rætturin til at veiða av tilfeinginum lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygt er atkomuligur hjá øllum undir heilt ávísum treytum.

Marknaðarkreftirnar skulu heilt og fult ráða fyri, hvør kostnaðurin verður fyri at leiga rættin at veiða burturav fólksins ogn í ávísum tíðarmáli. Prísásetingin í Tilfeingisbúðini er skottað burtur frá politiska myndugleikanum. Vinnan og marknaðurin ráða burturav fyri, hvør leigan av rættinum er, og tí ber heldur ikki til at siga, hvør almenna inntøkan verður av hesum handli, tó skal hendan tekniska funktiónin í minsta lagi vera sjálvfíggjandi, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Modellið verður fyrstu ferð roynt, nú 20.000 tons av makreli fara at vera seld á uppboði. Kanska tað gevur eina ábending um, hvussu skipanin kann virka, leggur hann afturat.



**Trygdarskeiðini og onnur sjóvinnulig skeið fara inn í eina nýggja, hátøkniliga tíð á nýggja sjóvinnuskúlanum. Hann fer millum annað eisini at bjóða tyrluskeið til frálandavinnuna. Útisiglarar fara eisini at kunna taka øll teirra skeið á sjóvinnuskúlanum í Klaksvík, sum tískil fær eitt munandi betri inntøkugrundarlag.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Tá Trygdarmiðstøðin flytir inn á nýggja sjóvinnuskúlan í Klaksvík, verður tað til heilt aðrar umstøður og hentleikar enn í dag. Harvið hendir eisini ein kollvelting av bæði undirvísing, venjing og skeiðsútboði.

Størsta framstigið er venjingarhylurin og útgerðin, ið hoyrir til



# Sjóvinnuskeiðini skulu vinna pening

hann. Til ber at broyta hitan í hylinum, og við blásarum, sprinklarum og ljósseting ber til at eftirgera veðurlíkindi av øllum slagi.

Piddi (Petur Ingvard) Jacobsen, skeiðslærari á Trygdarmiðstøðini, væntar sær nógv av nýggju umstøðunum.

– Har fáa vit stýrt venjingunum, og tær verða líka fyri øll, líka mikið hvør árstíðin er, og hvussu veðrið er. Við hitastýring, ljóseffektum, vindi og regni kunnu vit undir skipaðum viðurskiftum venja í eftirgjørdum illveðri og vandastøðum. Tað hava vit als ikki møguleika fyri í dag. So sjálvt um onkur kanska heldur tað øvugta, tí venjingarnar nú verða innandura, so verður talan um størri avbjóðingar og betri venjing, sigur hann.

## ÚTISIGLARAR Á SKEIÐ HEIMA

Higartil hevur ikki borið til at halda fleiri av skeiðunum, sum sjófólk í altjóða handilsflotanum skulu taka, tí útgerðin hevur ikki verið til tað. Tískil hevur stóri hópurin av føroyskum útisiglarum verið noyddur at tikið hesi skeið uttanlands.

Hetta verður ikki neyðugt longur, tí nú fer at bera til at taka at kalla øll altjóða sjóvinnuskeið í Klaksvík.

Eisini sonevnda HUET-skeiðið, sum fólk á boripallunum skulu hava, tí tey javnan og í øllum veðri ferðast til og frá pallunum í tyrlu. HUET er stytting av enska Helicopter Underwater Escape Training og merkir venjing í at bjarga sær úr søkkandi tyrlum. Til endamálið verður nýttur ein eftirgjørdur tyrluskrokkur við setrum, sum kann søkkjast niður í venjingarhylin.

– Hetta og allir hinir nýggju møguleikarnir gera tað eisini meira spennandi hjá okkum lærarum at arbeiða her, sigur Piddi Jacobsen.

Lærarar frá Mærsk Training Center í Esbjerg hava verið í Klaksvík og hildið skeið fyri lærarunum á Trygdarmiðstøðini við teirra egnu útgerð.

## PENGAR Í KASSAN

Skipað samstarv er millum sjóvinnuskúlan og Mærsk, og leiðslan væntar sær nógv av hesum samstarvi, tí so nógvir føroyingar sigla ella arbeiða í frálandavinnu hjá Mærsk.

– Tað er greitt, at tað fer at geva eitt munandi betri inntøkugrundarlag, um allir føroyingarnir hjá Mærsk fara at taka kravdu sjóvinnuskeiðini her heldur enn uttanlands, sigur Hanus Kjølbro, deildarleiðari á sjóvinnuskúlanum.



*Piddi (Petur Ingvard) Jacobsen, lærari, væntar størri avbjóðingar og betri venjing, tá Trygdarmiðstøðin saman við Klaksvíkar Sjómansskúla fer undir tak í nýggja sjóvinnuskúlanum.*

# YMISKAR MEININGAR
## um nýggju venjiumstøðurnar

**Enn verða trygdarskeiðini í Klaksvík hildin sum vant við undirvísing í Bøgøtu og sjóvenjing á Borðoyavík. Á nýggja sjóvinnuskúlanum verður øll venjingin, uttan tann í skjóttgangandi báti, undir taki í einum vælúrgjørdum hyli. Vit hava verið á trygdarskeið og spurt tveir luttakarar um, hvat teir halda um komandi broytingina.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*



*Sjóvenjingar við skjóttgangandi báti – MOB-báti – fara framhaldandi at verða gjørdar á sjónum á Borðoyavík.*



*Mortan Jacobsen, Klaksvík, 36 ár, stýrimaður á Ågot:*

„Eg havi tíbetur ongantíð enn havt brúk fyri tí, eg læri á trygdarskeiðnum, men tað gevur eina góða kenslu av tryggleika. Mær hevði dámt betri, at venjingin varð verandi á sjónum sum nú, tí her hevur tú betri føling við, hvussu tað vildi kenst at veri í eini vandastøðu í veruleikanum. Eg óttist, at fólk ikki fara at taka venjingina í líka stórum álvara, tá hon verður í einum hyli inni í eini høll.“



*Jørmund Gaardlykke, Glyvrar, 64 ár, maskinmeistari á Ran.*

„Nú verður hetta mítt seinasta trygdarskeið, so eg sleppi ikki at royna hylin og nýggju útgerðina. Men eg vænti, at trygdarskeiðini verða betri, tí tað ber til at eftirgera hita- og veðurumstøðurnar í hasum venjingarhylinum. Venjingarútgerðin og umstøðurnar eru góðar á Borðoyavík, men veðrið fær ein onki gjørt við her. Í dag er fínasta veður, men tað er tað langt frá altíð í eini neyðstøðu á sjónum.“

# Framtíð ella blindgøta

**Stjórin á tekniska skúla og nýggja sjóvinnuskúlanum í Klaksvík óttast, at skiparaútbúgvingin og maskinistútbúgvingin enda sum blindvegir, tá tær ikki longur fara at geva atgongd til ávikavist skipsføraraútbúgvingina og maskinmeistaraútbúgvingina. Deildarleiðarin á sjóvinnuskúlanum er meira bjartskygdur, men stjórin á Vinnuháskúlanum í Havn væntar, at tørvurin á skiparaútbúgvingini og maskinistútbúgvingini fánar burtur.**



*Hanus Kjølbro, deildarleiðari í nýggja sjóvinnuskúlanum, sum fær navn í heyst: – Tað verður ikki so einfalt sum nú, men tað skal framhaldandi bera til at taka ein part frá teimum styttru útbúgvingunum við sær til nýggju bachelorútbúgvingarnar.*



*Rúni Heinesen, stjóri á sjóvinnuskúlanum og Tekniska Skúla í Klaksvík, óttast, at skiparaútbúgvingin verður ein blindgøta, tá hon ikki longur fer at geva beinleiðis atgongd til skipsføraraútbúgvingina og telja fult við har.*

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Sjóvinnuskúlin í Klaksvík er ein veruleiki, sjálvt um tað dregur út at fáa samanløgdu stovnarnar undir sama tak.

Tað næsta stigið í ætlanini hjá Helenu Dam á Neystabø um sjóvinnuligu útbúgvingarnar er ikki tikið enn, men stendur tað til hana, verða skipsføraraútbúgvingin og maskinmeistaraútbúgvingin, sum Vinnuháskúlin í dag stendur fyri, uppstigaðar til bachelorútbúgvingar á Fróðskaparsetrinum við skúlaársbyrjan á sumri 2012.

## MOTIVERAÐIR NÆMINGAR

Tá krevst miðnámsskúlaútbúgving fyri at sleppa inn á hesar útbúgvingarnar.

Tí óttast Rúni Heinesen, stjóri á sjóvinnuskúlanum og Tekniska Skúla í klaksvík, at skiparaútbúgvingin og maskinistútbúgvingin enda sum blindgøtur. Næsta summar vera hesar útbúgvingarnar burtur av í Klaksvík.

– Nógvir av teimum, sum í dag fara á skiparaskúla, hava bara 9. flokk frammanundan. Men teir eru fullir av motivasjón og áræði, klára seg tískil væl og fara víðari til skipsførara. Tað sama er galdandi fyri maskinistarnar, sum lesa víðari til maskinmeistara. Men hesir verða forðaðir, tá tær longru útbúgvingarnar verða uppstigaðar til bachelor og atgongdskrøvini herd, og tað vil vera spell.

– Í londunum rundam um okkum leggja tey seg eftir at skipa útbúgvingarnar við modulum soleiðis, at lesandi altíð fáa tað við sær, sum tey longu hava lært, tá tey fara at lesa víðari. Her tykist ætlanin vera tann øvugta, sigur Rúni Heinesen, stjóri á sjóvinnuskúlanum í Klaksvík.

## ONGIN VANLUKKA

Hans Johannes á Brúgv, stjóri á Vinnuháskúlanum í Havn, væntar heldur ikki, at styttru útbúgvingarnar til skipara og maskinist fara at fáa eina gylta framtíð, men hann sær hinvegin onga vanlukku í tí gongdini.



*Í venjingarhylinum í nýggja sjóvinnuskúlanum ber til at eftirgera allar møguligar neyðstøður og veðurlíkindi við ljósseting, vindblásarum, eftirgjørdum regni og stýring av hitanum í vatninum. Eisini er útgerð at halda HUET-skeið, tað er venjing í bjarging úr søkkandi tyrlu.*

– Stórt sæð allir skipararnir fara víðari til skipsførara, og longu nú síggja vit, at alsamt fleiri hava miðnámsskúla, tá teir byrja. Av teimum seinastu, sum byrjaðu til skipsførara, høvdu 27 prosent miðnámsskúla frammanundan. Og vit mugu bara staðfesta, at vit bert taka maskinistnæmingar inn triðja hvørt hálvár, tí tørvur ikki er á meira, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum.

Hann vísir á, at ætlanin eisini er, at tað skal bera til hjá teimum, ið ikki hava miðnámsskúla frammanundan, at taka skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar upp á fýra ár í staðin fyri trý sum nú.

## EIN ØÐRVÍSI BILTÚRUR

Hanus Kjølbro, deildarleiðari á nýggja sjóvinnuskúlanum í Klaksvík, situr í einum fylgibólki, ið skal ráðgeva Mentamálaráðnum í sambandi við ætlaðu uppstiganini av skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingunum á bachelor-støði.

Hann vónar, at tær styttru sjóvinnuútbúgvingarnar ikki enda sum blindvegir, og hann heldur ikki, at tær nýtast at gera tað.

– Í dag er skiparaprógvið atgongdskravið til skipsførara, og tú kanst fara beinleiðis til maskinmeistara við einum maskinistprógvi. Hetta verður broytt, men tað skal gerast so smidligt, sum til ber, soleiðis at framhaldandi skal bera til at taka ein part frá teimum styttru útbúgvingunum við sær til bachelorútbúgvingarnar.

– Eg vil samanbera tað við ein biltúr, har tú í dag kanst koyra teinin út í eitt í sama bili. Tá nýggja skipanin verður klár, mást tú steðga við ein stein á vegnum, fara úr bilinum, ganga framvið steininum og seta teg í ein annan bil. Verri enn tað verður tað ikki, sigur Hanus Kjølbro.

# Innflyting helst seinkað

**Politiskt klutur seinkar innflytingina í nýggja sjóvinnuskúlan í Klaksvík, men samanleggingin av Klaksvíkar Sjómkansskúla og Trygdarmiðstøðini í Klaksvík verður tó ikki steðgað av hesum.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*

Eftir ætlan skuldi flytingin úr Trygdarmiðstøðini og Klaksvíkar Sjómansskúla í nýggja sjóvinnuskúlan byrja 1. juli, og leigumálið hjá Trygdarmiðstøðini í Bøgøtu er eisini uppsagt til tá.

Men 2,8 milliónir krónur vantaðu í at keypa innbúgv fyri og gera ymiskar ábøtur, so bygningurin lýkur krøvini til brunatrygd og onnur byggikrøv.

## NEI TIL EYKAJÁTTAN

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, ið varar av bygginini, og landsstýriskvinnan í mentamálum, ið varar av rakstrinum av sjóvinnuskúlanum, høvdu biðið fíggjarnevndina um í skundi at játta pengingin sum eina eykajáttan við einum sonevndum fíggjarnevndarskjali, tí Løgtingið er farið í summarfrí.

Men minnilutin í fíggjarnevndini nýtti regluna um minnilutaverju til at sýta umbønini um eykajáttan, og tí er nú púra óvist, nær flytast kann í bygningin.



*Nýggi Sjóvinnuskúlin á Faktorsvegi tekur yvir verandi lærarامanning – tríggir lærarar frá Trygdarmiððstøðini og fýra frá Sjómansskúlanum, Hanus Kjølbro, deildarleiðari, íroknaður. Eisini verður eitt fólk í umsitingini. Væntandi verður í minsta lagi brúk fyri tveimum lærarum afturat næsta ár, tá skúlin verður einsamallur um at taka skipara- og maskinistnæmingar inn.*

– Skúlin er uttan innbúgv, og ein millión krónur av teimum 2,8 milliónunum skulu brúkast til tað. Uttan innbúgv ber ikki til at hava nakra undirvísing har. Eisini skulu pengar brúkast til lógarkravdar ábøtur, eitt nú brunatrygga klæðing av einum innveggi, og til ábøtur, sum hava meira við komfort at gera. Til dømis er neyðugt at bjálva tekjuna í høllini, har venjingarhylurin er, tí hylurin elvir til so nógva døgg, sigur Rúni Heinesen, sum er stjóri á bæði nýggja sjóvinnuskúlanum og á Tekniska Skúla í Klaksvík.

## SKJÓTT AT GERA FLYTIKLÁRT

Tað er tí lítið sannlíkt, at skiparanæmingarnir og tey, ið skulu á trygdarskeið og onnur sjóvinnulig skeið, verða undir sama taki beinanvegin eftir summarfrítíðina.

– Um neyðugi peningurin verður játtaður skjótt eftir, at Løgtingið er komið saman aftur á ólavsøku, so nýtast ikki at ganga meira enn einar seks vikur, áðrenn klárt verður at flyta inn í nýggja sjóvinnuskúlan. So mugu vit finna út av, hvat vit gera til tá. Klaksvíkar Sjómanskúli er jú tøkur, og kanska sleppur Trygdarmiðstøðin at leiga eina tíð afturat í Bøgøtu. Men enn er so ongin avgerð tikin um hatta, sigur Rúni Heinesen.

## SAMANLEGGING HELDUR FRAM

Men sama hvussu verður við hølisviðurskiftunum, so heldur samanleggingin av Trygdarmiðstøðini og Klaksvíkar Sjómansskúla í ein nýggjan sjóvinnuskúla fram.

Um eitt ár skal sjóvinnuskúlin í Klaksvík sostatt hava einkarrætt til



*Klaksvíkar Sjómansskúli (vinstrumegin) verður verandi tøkur, í øllum førum fyribils. Kokkaútbúgvingin heldur eisini fram har. Leigumálið hjá Trygdarmiðstøðini í Bøgøtu (niðanfyri) er uppsagt, men tað verður helst uppafturtikið, til tað verður klárt at flyta inn í nýggja sjóvinnuskúlan.*



skiparaútbúgvingina, og Tekniski Skúli í Klaksvík verður einsamallur um at útbúgva maskinistar.

– Tann politiska avgerðin er langt síðani tikin og tilgongdin byrjað, við at trygdarmiðstøðin varð flutt úr Fiskimálráðnum og undir Mentamálaráðið 1. januar, og báðir skúlarnir hava havt eina leiðslu síðani tá, vísir Rúni Heinsen á.

Hann er stjóri, men Hanus Kjølbro deildarleiðari, hevur dagligu leiðsluna av sjóvinnuskúlanum, sum ikki hevur fingið navn enn.

## TVÆR MENTANIR GIFTAST

– Fyri meg verður tað ein sera spennandi og áhugaverd uppgáva at fáa hesar báðar stovnarnar, Trygdarmiðstøðina og Klaksvíkar Sjómansskúla, giftar. Tvær mentanir skulu samansjóvast og fáast at virka undir sama taki. Vit hava eisini funnið rætta navnið til skúlan, men tað verður ikki almannakunngjørt fyrr enn einaferð eftir summarfrítíðina, sigur Hanus Kjølbro.

Eftir summarfrítíðina í 2012 fær sjóvinnuskúlin einkarrætt upp á skiparaútbúgvingina, og Tekniski Skúli í Klaksvík fær einkarrætt upp á maskinistútbúgvingina. Skipsførarútbúgvingin og maskinmeistaraútbúgvingin vera í Havn.

Tá verður Brandskúlin við Áir eisini partur av sjóvinnuskúlanum í Klaksvík.

## BRANDSKÚLIN BÍÐAR

– Vit samstarva longu við brandskúlan, soleiðis at teir bara fáast við eld og vit við sjógv. Tað merkir, at vit eru givnir at gera egin skeið í roykkaving, og tey eru givin at skipa fyri trygdarskeiðum, greiðir Rúni Heinesen frá.

Sjálvt um Brandskúlin eisini kemur undir hansara veingjabreiði næsta summar, so væntar Rúni Heinesen, at brandskúlin verður verandi við Áir í nøkur ár.

– Tey hava ein brandtøkniliga hampuliga vælútgjørdan skúla har, og tær umsøðurnar kunnu vit ikki enn bjóða í Klaksvík. Við tíðini er tó meiningin, at brandskúlin eisini skal flyta higar, sigur stjórin á sjóvinnuskúlanum.

# Fakfeløgini stuðla útbúgvingarreformi

**Formenninir í Maskinmeistarafelagnum og Skipara- og Navigatørfelagnum taka fult undir við ætlaðu uppstiganini av maskinmeistaraútbúgvingini og skipsføraraútbúgvingini til bachelor-útbúgvingar.**

*Eftir Ingolf S. Olsen*



*Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum:*

„Eg eri sjálvandi greiður yvir, at tað fer at raka onkran, tá tað ikki longur fer at bera til at fara beinleiðis víðari til skipsførara við einum skiparaprógvi. Eg haldi tó, at landið er ov lítið til, at vit bæði hava eina bachelor-skipsføraraútbúgving og hana, sum vit kenna í dag. Men skal eg velja aðra, so velji eg heldur bachelor-útbúgvingina. Eg haldi einfalt, at tann tíðin er farin, har farið verður beinleiðis av skipsdekkinum at lesa til skipsførara. Hinvegin fer tað framvegis at bera til at fara til dømis til Danmarkar at lesa víðari til skipsførara við einari føroyskari skiparaútbúgving og fáa hana alla góðskrivaða. Eg skilji argumentini hjá teimum sum óttast, at tað fer at verða verri at seta nýggjar skiparar við í fiskiflotanum, men eg vænti ikki, at tað verður nakar stórur trupulleiki. Ein skipari kann sum er føra farmaskip upp til 3000 tons, so kapping er longu í dag millum farmaflotan og fiskiflotan um skiparanar.“



*Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, limur í fylgibólki at ráðgeva landsstýriskvinnuni í mentamálum:*

„Eg eri ikki í iva um, at uppstigingin til bachelor er tað rætta at gera. Tað verður tosað so nógv um, at vit bjóða okkara ungu lestrarmøguleikar, so teir klóku heilarnir verða verandi her heima. Bacheloruppstigingin samsvarar væl við ta hugsanina. Og við eini maskinmeistara-bachelorútbúgving er vegurin opin at lesa víðari, eitt nú til verkfrøðing. Nú er tað eitt sindur øðrvísi við maskinmeistarum samanborið við skipsførararnar, tí eg vil halda upp á, at okkurt um helvtin av einum maskinmeistaraárgangi als ikki siglir. Teir eru farnir í onnur størv. Her heima er tað serliga størv, sum hava við orku ella hydraulikk at gera. Onkrir sigla í nøkur ár og fara síðani í land at arbeiða, men nógvir fara ongantíð á sjógvin. Tað eru eisini nógv ár síðani, at maskinistútbúgvingin varð tikin burtur úr, so hon ikki longur er ein partur av maskinmeistaraútbúgvingini mótvegis skiparaútbúgvingini, sum enn er partur av skipsføraraútbúgvingini. Vit síggja eisini, at alt fleiri av teimum, ið søkja inn til maskinmeistaraskúlan, longu hava miðnámsskúlaútbúgving frammanundan.“


Betri at hava gott í væntu
Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum hevur tú møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjónssamansparing og lívstrygging.
Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.
Um tú hevur allar tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, kanst tú fáa heilt upp til 15% í avsláttri av tryggingargjaldinum. Um tú harumframt ert kundi hjá Betri pensjón, og rindar í minsta lagi kr. 18.000,- árliga til Betri pensjón, fært tú 20% í avsláttri av tínum tryggingum, óansæð um tú hevur eina, tvær, tríggjar, fýra ella fleiri tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Samanlagt kann hetta geva heilt upp til 32% í avsláttri.
Vit geva tær persónliga ráðgeving og seta pensjón og tryggingar saman eftir tínum tørvi, so tú kanst spara sum mest saman til eitt betri lív við eftirløn. Meira fæst at vita á telefon 345 700 ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo
betri.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari
Betri pensjón